# Ársfrágreiðing
# 2022



Ráðið fyri gransking, menning og nýskapan

**Ársfrágreiðing 2022**

**Útgivið**
Ráðið fyri gransking, menning og nýskapan
og Granskingarráðið

**Sniðgivið**
VIRKA

**Prent**
Føroyaprent

**ISBN**
978-99972-903-0-4

# Ráðið fyri gransking, menning og nýskapan

Ráðið fyri gransking, menning og nýskapan er sambært løgtingslóg nr. 89 frá 7. juni 2020 sett at ráðgeva Føroya landsstýri og vinnu um yvirskipaða politikk Føroya við felags hugsjón, sum fevnir um gransking, menning og nýskapan.

Skrivarauppgáva Ráðsins er sambært lógini løgd til fyrisitingina í Granskingarráðnum at røkja.

Ráðið fyri gransking, menning og nýskapan telur formann og seks limir, sum landsstýrisfólkið í granskingarmálum velur eftir persónligum eginleikum og fakligum førleikum. Ráðslimirnir umboða tilsamans vitan um og royndir við gransking, menning og nýskapan bæði alment og vinnuligt. Ein meiriluti av ráðslimunum skal hava granskingarførleika í minsta lagi á lektarastigi, og fleiri skulu hava viðkomandi og drúgvar royndir úr vinnuni.

**Ráðslimirnir eru:**

**Tórheðin J. Jensen**
formaður, DBA, marknaðarførings- og umsitingarleiðari hjá Varðanum

**Annika H. Davidsen**
ph.d., adjunktur í sálarfrøði á Fróðskaparsetri Føroya

**Eyðun E. Jacobsen**
ph.d. í teldufrøði, ráðgevi hjá Klintra

**Gunnvør á Norði**
ph.d. í lívfrøði, deildarleiðari á Fiskaaling

**Jan Rasmussen**
ph.d., serlækni í hjartasjúkum á Landssjúkrahúsinum

**Ragnheiður Bogadóttir**
ph.d., lektari í samfelagsvísindum á Fróðskaparsetri Føroya

**Sóley H. Hammer**
MA í løgfrøði, leiðari í Hugskotinum

# Formæli

Ársfrágreiðingin veitir eina støðulýsing og meting av almennu gongdini viðvíkjandi gransking, menning og nýskapan í Føroyum og av støðuni í mun til altjóða samstarv umframt tilráðingar í hesum sambandi. Frágreiðingin er ætlað sum grundarlag fyri kunning og kjaki.

Higartil hava vit ikki havt nøkur formlig hagtøl um gransking, menning og nýskapan í Føroyum, men við játtan á fíggjarlógini hevur Granskingarráðið, í tøttum samstarvi við Hagstovu Føroya, sett hol á hetta týdningarmikla arbeiði, og eftir ætlan verða fyrstu hagtølini klár at nýta til næstu ársfrágreiðing.

Ráðið fyri gransking, menning og nýskapan fór til verka í apríl 2022. Limirnir hava síðan hitst til fundar umleið eina ferð um mánaðin. Nógv kjak hevur verið um, hvussu uppgáva Ráðsins best kann røkjast: hvørji viðurskifti dentur eigur at leggjast á, hvørjum stigi best er at virka á og hvørjum sjónarhornum best er at taka støði úr.

Uttan formlig hagtøl hevur Ráðið við hesi fyrstu frágreiðing lagt seg eftir at lýsa og meta um gongdina viðvíkjandi gransking, menning og nýskapan í Føroyum á annan hátt. Tað hevur fyrst og fremst verið gjøgnum samskifti við granskingarstovnar og nýskapandi fyritøkur, ið vórðu boðin at greiða frá sínum virksemi og umstøðum at granska, menna og nýskapa. Harumframt er støðulýsingin grundað á vitan og tøl, sum Granskingarráðið kundi veita.

Ráðið hevur eisini havt vitjan av útlendskum serfrøðingum, sum hava veitt innlit í líknandi arbeiði í okkara grannalondum.

Ráðið hevur skift orð um, hvørji tiltøk Ráðið skal fyriskipa fyri at kasta ljós á ymisk viðurskifti viðvíkjandi gransking, menning og nýskapan. Farið verður undir fyrstu tiltøkini í heyst.

Henda ársfrágreiðing er hin fyrsta av sínum slagi og er merkt av, at grundarsteinarnir mugu leggjast.

**Tórshavn, august 2023**

**Tórheðin J. Jensen**
Formaður
Ráðið fyri gransking, menning og nýskapan

**Rósa Heinesen**
Skrivari og fulltrúi
Granskingarráðið

# Innihald

**Formæli** **4**

**Samandráttur** **6**

**1. Inngangur** **8**

1.1 Hví gransking, menning og nýskapan 8

1.2 Hví almennar íløgur í gransking, menning og nýskapan 10

1.3 Hví altjóða samstarv um gransking, menning og nýskapan 11

**2. Støðulýsing** **12**

2.1 Granskingarstovnar og undirstøðukervi 12

2.2 Ph.d.-lestur 18

2.3 Stuðulsskipanir 21

2.4 Altjóða samstarv 24

2.5 Hagtøl 26

**3. Meting av almennu gongdini** **28**

3.1 Vantandi fígging og oyramerkt tíð 28

3.2 Meira samstarv og betri samskipan 30

**4. Mál og tilmæli** **32**

**5. Skilmarkingar** **39**

**6. Keldulisti** **42**

# Samandráttur

Gransking, menning og nýskapan eru avgerandi fyri at brynja okkum til eina framtíð við broyttum fortreytum. Tørvur er á eini hugburðsbroyting frá fatanini um, at gransking, menning og nýskapan eru ein útreiðsla, tí í veruleikanum eru tey **ein avgerandi íløga** fyri at menna, ríka og ikki minst tryggja okkum sum land bæði búskaparliga, samfelagsliga og umhvørvisliga í nógv ár fram.

Gransking, menning og nýskapan hava verið raðfest í ávísan mun í Føroyum seinastu árini. Avtala er gjørd við ES um luttøku í Horizon Europe-skránni, sum veitir møguleikar fyri stórum stuðulsupphæddum til bæði gransking, menning og nýskapan. Fróðskaparsetrið hevur eisini fingið hægri játtan til fyrisiting, sum hevur bøtt um umstøðurnar at granska har.

Ráðið fyri gransking, menning og nýskapan metir, at gransking, menning og nýskapan kunnu samskipast betri á nógvum mótum í Føroyum. Nógvir ótroyttir møguleikar eru at skapa meira samvirkan millum stovnar eins og millum almenna og privata geiran. Við betri samskipan ber til bæði at fáa meira, betri og munadyggari gransking, menning og nýskapan burturúr og at spara tíð, orku og pening.

Granskingarstovnar og nýskapandi fyritøkur eru tó á einum máli um, at alstórur tørvur er á at seta **nógv fleiri pengar** av til gransking, menning og nýskapan í Føroyum. Játtanin til stuðulsskipanina til gransking, sum Granskingarráðið umsitur, hevur í krónum og oyrum staðið mestsum í stað í 15 ár. Við prístalsviðgerð merkir hetta í veruleikanum, at hon er minkað, samstundis sum granskaralønin er hækkað munandi.

Játtanirnar til rakstur av granskingarstovnum eiga í minsta lagi at fylgja við prístalinum og í fleiri førum økjast. Neyðugt er eisini at vera opin fyri **útlendskari fígging,** men tílík fígging er í stóran mun treytað av almennari grundfígging og nøktandi kørmum á stovnunum. Dagligi raksturin á granskingarstovnum má ikki verða ov tengdur at útlendskum fíggingarkeldum, tí tað gevur ov stór sveiggj í inntøkunum.

Endamálið við allari gransking í Føroyum má vera at skapa vitan til gagns fyri føroyska samfelagið, og tí er umráðandi at ansa eftir, at tað ikki vera onnur enn vit sjálvi, ið stýra. Um eginfíggingin er lutfalsliga lítil, kann privat og útlendsk fígging skjótt taka stýringina.

Í øðrum londum verða gransking, menning og nýskapan roknað sum ein **íløga,** men í Føroyum verður játtanin til gransking skrásett sum ein útreiðsla, sum telur niður í tjóðarroknskapinum. Ágóðar frá íløgum í gransking, menning og nýskapan síggjast aftur á ymsan hátt og í ymsum skapi. Gransking, menning og nýskapan útvega nýggja vitan, førleikar og amboð til at nøkta verandi og framtíðar tørv á øllum samfelagsøkjum og eru í síðsta enda við til at tryggja okkara vælferð og fólkaræði.

Evroparáðið hevur sett sum mál, at 3% av BTÚ skal brúkast til gransking, menning og nýskapan. Føroyar eiga at seta sær sama mál sum londini, vit samanbera okkum við, serliga um vit skulu halda fram við og økja okkara samstarv og kapping við hesi.

Ráðið fyri gransking, menning og nýskapan mælir til, at **Fróðskaparsetur Føroya** fær ein munandi størri leiklut viðvíkjandi gransking, menning og nýskapan, enn tað hevur í dag. Vísindaligu førleikarnir á Fróðskaparsetrinum eiga at verða gagnnýttir og mentir í samstarvi við aðrar stovnar. Tað fer at gera, at útbúgvingar innan til dømis matvøru kunnu skipast í samstarvi við Heilsufrøðiligu Starvsstovuna, heilsuútbúgvingar kunnu knýtast at Sjúkrahúsverkinum og fiskalívfrøði at Fiskaaling. Fyri heilsuverkið kann tað hava við sær, at Landssjúkrahúsið verður universitetssjúkrahús.



**Fyrisitingin hjá Fróðskaparsetrinum er í Gróthúsinum**

Fróðskaparsetrið skal vera eitt slag av regnskjóli yvir allar aðrar granskingarstovnar, men stovnarnir eiga framvegis at hava egna játtan og sjálvræði.

Mælt verður eisini til, at ein **depil fyri gransking, menning og nýskapan** verður mentur á Fróðskaparsetrinum, ið skal styrkja tvørfakliga samstarvið, bæði stovnanna millum og millum alment og privat. Ein tílíkur depil eigur at verða partur av nýggja kampusinum, ið skal skipast á Frælsinum. Hann skal verða savningarstað fyri granskarar, nýskaparar, íverksetar, íleggjarar og lesandi og kann eisini gerast karmur um eina víðkaða útgávu av iNOVA við granskingarundirstøðukervi, ið er til taks fyri allar áhugapartar.

Tað hevur stóran týdning, at Føroyar luttaka í **altjóða samstarvi** um gransking, menning og nýskapan, sum gevur okkum nýggja vitan og netverk. Føroyar hava valt at vera við í fleiri útlendskum skipanum, sum geva føroyskum granskarum møguleika at søkja stuðul til gransking, menning og nýskapan, men eingin skipað ætlan er fyri luttøku okkara í altjóða samstarvi.

Tað er greitt, at vit ikki gagnnýta verandi skipanir til fulnar, lutvíst vegna vantandi orku og førleikar at søkja um luttøku og stuðul. Ráðið mælir til at styrkja karmarnar fyri føroyskari luttøku í altjóða samstarvi við at seta munandi játtanir av til luttøku í evropeiskum og norðurlendskum partaløgum og til fyrisitingarligan stuðul til arbeiðið við umsóknum og verkætlanum.

Fyrisitingarligur stuðul til umsóknararbeiði og verkætlanarfyrisiting er vorðið raðfest í ávísan mun við nýggju granskingar- og framtakseindini á Fróðskaparsetrinum. Ráðið mælir til, at hendan tænastan eisini verður tøk hjá øðrum granskarum og nýskaparum enn teimum, sum eru beinleiðis knýtt at Fróðskaparsetrinum.

Talið av granskarum í Føroyum er nógv økt seinastu árini, men enn er tørvur á at menna føroyska gransking innan fleiri fakøki. Bert 24 av teimum 122 føroyingunum, sum hava lokið ph.d.-prógv seinastu 10 árini, hava gjørt tað á Fróðskaparsetrinum. Ynskiligt hevði verið at fingið **fleiri hægri útbúgvingar** í Føroyum, serliga innan tøkni, KT, byggifrøði og matvørufrøði. Ráðið mælir til, at ein ætlan verður løgd fyri, hvussu Føroyar kunnu verða meira áhugaverdar fyri teir bólkar av starvsfólki, granskarum og íverksetum, sum tørvur er á, og hvussu fleiri útbúgvingar kunnu verða skipaðar á hesum økjum.

Í grannalondunum eru **stuðulsskipanir og fíggingarleistir,** sum vit ikki hava roynt í Føroyum. Fleiri lond hava skattafrádráttir fyri granskingar-, menningar- og nýskapanarvirksemi og skattafyrimunir fyri útlendskar granskarar. Ráðið mælir til at kanna, um tílíkar skipanir høvdu verið gagnligar í Føroyum.

# 1. Inngangur

Gransking og menning er skapandi og skipað arbeiði, sum hevur til endamáls at økja um vitanarfæið, harímillum vitan um mannaættina, náttúruna, mentan og samfelag, og at finna nýggjar hættir at brúka tøka vitan.

Skylt við gransking og menning er nýskapan, sum – tíðum grundað á gransking – er verkseting av nýggjari ella munandi betraðari vøru ella tænastu, tilgongd ella mannagongd í sambandi við marknaðarføring, samskifti ella skipan av arbeiði.

"

*Hvørjum skulu vit liva av, tá ið niðurgongd er í fiskivinnuni ella alivinnuni?*

## 1.1 Hví gransking, menning og nýskapan

Gransking, menning og nýskapan eru avgerandi fyri at tryggja okkara vælferðarsamfelag búskaparliga, samfelagsliga og umhvørvisliga í nógv ár frameftir.

Fyri samfelagið er høvuðsendamálið við gransking, menning og nýskapan at útvega nýggja vitan, førleikar og amboð til at nøkta verandi og framtíðar tørv. Fyri fyritøkur er málið at fáa úrslit, sum til dømis ein víðkaðan marknaðarpart, økta sølu ella størri inntøku.

Gransking, menning og nýskapan hava til allar tíðir umskapað okkara gerandisdag og samfelag. Tey hava bøtt munandi um lívskor, skert hungursneyð og longt livialdurin hjá milliónum av fólkum kring heimin. Undirsjóvartunlarnar høvdu vit ikki havt uttan drúgva gransking innan til dømis verkfrøði og jarðfrøði, og fiskiskipini høvdu ikki komið langt uttan holla vitan um eitt nú maskinverkfrøði, navigatión og alisfrøðina handan flotføri, javnvág og rekmátt.

Nógv bendir á, at **umhvørvisligu og politisku fortreytirnar,** vit hava vant okkum við, eru í broyting. Neyðugt verður tí við eini broyting í hugburði – einum paradigmuskifti – í mun til, hvussu vit sum samfelag hugsa og tosa um gransking, menning og nýskapan.

Minkandi lívfrøðiligt margfeldi og veðurlagsbroytingar eru nýggjar fortreytir, ið seta hugtøk sum burðardygd, endurnýggjan og mótstøðuføri fremst á dagsskránna.

Sum fjarskotið oyggjasamfelag, ið búskaparliga og vinnuliga er sera bundið at einstakari ráváru, samstundis sum flestu av okkara grundleggjandi samfelagsfunktiónum eru bundnar at innfluttari orku og tilfeingi, eru Føroyar viðbreknar fyri sveiggjum og broytingum. Besta amboð, vit hava at brynja okkum til tær avbjóðingar, sum koma, er **breitt og fjølbroytt vitanartilfeingi**, ið ger okkum før fyri at laga okkum til nýggjar og broyttar umstøður.

Okkara nærmasti granni, Ísland, sum vit líkjast nógv á fleiri økjum, ger stórar íløgur í gransking, menning og nýskapan, millum annað fyri at gerast minni tengt at fiskivinnuni – ráváruvinnuni – sum er mett at vera óstøðug og ótrygg at dúva uppá í komandi tíðum[1].

Í Føroyum eiga vit eisini at spyrja, hvørjum vit skulu liva av tá ið niðurgongd er í fiskivinnuni ella alivinnuni.

Á uttanríkispolitiska pallinum eru stórar rembingar, sum viðkoma okkum – í nógvum førum av tí einføldu orsøk, at vit liggja her, sum vit liggja, í Norðuratlantshavi. Ein avleiðing er, at **áhugin fyri Føroyum uttanífrá veksur,** eisini á granskingar-, menningar- og nýskapanarøkinum. Hetta sæst millum annað aftur í teimum lutfalsliga stóru upphæddunum, sum politikarar í Danmark nú hava avrátt at veita til gransking í Føroyum. Altjóða sjóneykan, sum av somu ávum í nógv ár hevur staðið á Grønlandi, leitar sær nú eisini til Føroya, og væntast kann, at áhugin fyri Føroyum fer at vaksa uppaftur meira.

Við peningagávum fylgja størri og smærri treytir, og aloftast liggja ávís áhugamál undir. Hesum mugu vit vera til reiðar at lofta við skipanum, sum áseta greitt, hvussu peningurin skal umsitast og brúkast.

1. McKinsey Scandinavia (2012) Charting a Growth Path for Iceland, version 1.0, McKinsey & Company



Forvitni er drívmegin
handan gransking

**Covid-19 farsóttin prógvaði greitt tørvin og virðið á hollari, skjótt atkomuligari vitan fyri heilsu og trygd hjá fólkinum. Við at nýta gransking og við hjálp frá nýggjari tøkni og førleikum bar til hjá samfelagnum at tillaga seg skjótt og væl.**

**Miðfyrisiting, stovnar og fyritøkur megnaðu uppá fáar dagar at tillaga seg eftir tørvi í eini heilt ókendari støðu.**

Tað hevur alstóran týdning, at vit fáa til vegar nýggja vitan og menna nýggja tøkni og vørur við støði í **føroyska tørvinum,** tí eingin annar granskar í serføroyskum viðurskiftum.

Gransking, menning og nýskapan hava alstóran týdning fyri framtíðina, um Føroyar skulu mennast, tryggjast og ríkast, og hetta má síggjast aftur í landsins politisku raðfestingum.

Ein fyrimunur, sum vit hava í Føroyum í mun til nógv onnur lond, og sum vit eiga at verja og dyrka, er okkara meir og minni vatnrætta valdsbýti, sum ger, at fólk kenna seg fræls at siga sína hugsan um bæði gott og ilt. Hetta er ein fortreyt fyri at kunna bøta og læra og ikki minst fyri at vera nýskapandi. Tað ger, at munandi styttri er millum hugskot og íverksetan enn í øðrum londum, har valdið er meiri loddrætt skipað.

Gransking, menning og nýskapan eru amboð til at avdúka sannroyndir, sum kunnu gagnnýtast til frama fyri samfelagið. Eins og øll onnur amboð kunnu hesi eisini misnýtast, um ikki rætt verður farið fram. Í okkara altjóðagjørda heimi, har vørur, tænastur, fólk og upplýsingar ferðast sum ongantíð áður, og tøknirisar hava fingið ovurstórt vald, er umráðandi at hava greiðar reglur viðvíkjandi granskingaretikki, granskaraábyrgd, reiðiligari gransking og váðastýring.

## 1.2 Hví almennar íløgur í gransking, menning og nýskapan

Í Føroyum verða gransking, menning og nýskapan raðfest í ávísan mun. Eitt gott dømi er avtalan við ES um Horizon Europe-skránna, sum veitir møguleikar fyri stórum stuðulsupphæddum til bæði gransking, menning og nýskapan. Fróðskaparsetrið hevur eisini fingið hægri játtan til fyrisiting seinastu árini, sum hevur bøtt um umstøðurnar at granska har.

Granskingarstovnar og nýskapandi fyritøkur eru tó á einum máli um, at alstórur tørvur er á at seta nógv fleiri pengar av til gransking, menning og nýskapan í Føroyum.

Játtanin til stuðulsskipanina til gransking, sum Granskingarráðið umsitur, hevur í krónum og oyrum staðið mestsum í stað í 15 ár. Við prístalsviðgerð merkir hetta í veruleikanum, at hon er minkað. Í sama tíðarskeiði er granskaralønin hækkað 29%. Tað merkir, at vit í 2022 høvdu uml. 14% færri granskingartímar, enn vit høvdu í 2007.

| | 2007 | 2022 | Vøkstur |
|---|---|---|---|
| **Játtan til gransking** | 6,7 mió. kr. | 7,5 mió. kr. | 12% |
| **Granskaraløn** | 25.500 kr./mðr. | 33.132 kr./mðr. | 29% |
| **Granskaratímar (160 t/mðr.)** | 42.039 | 36.219 | -14% |

*Tær 7,5 mió. kr., ið fara av fíggjarlógini til gransking, koma landinum aftur til góðar við einum virði á 9 mió. kr.*

Í USA og Evropa liggur árliga íløguavkastið frá alment fíggjaðari gransking, menning og nýskapan um 20% í miðal[2]. Í Føroyum vantar okkum hagtøl á økinum, men um støðan er nakað tann sama í Føroyum, koma tær 7,5 mió. kr., ið fara av fíggjarlógini til stuðulsskipanina til gransking, landinum aftur til góðar við einum virði á 9 mió. kr.

Í Føroyum verður játtanin til gransking skrásett sum ein útreiðsla. Tað merkir, at tær 7,5 mió. kr. telja niður í tjóðarroknskapinum.

Aðrastaðni verður gransking, menning og nýskapan roknað sum ein íløga. Tað verður eisini staðfest í altjóða handbókunum, ið áseta mannagongdina fyri hagtalsinnsavning viðvíkjandi gransking, menning og nýskapan. Við formligu hagtølunum skulu játtanir til gransking skrásetast sum íløgur í tjóðarroknskapinum[3] og tað merkir, at skrásetingin av hagtølunum í sjálvum sær fer at vaksa um føroysku bruttotjóðarúrtøkuna.

Burtursæð frá tjóðarroknskapinum síggjast ágóðarnir frá gransking, menning og nýskapan aftur á ymsan hátt og í ymsum skapi. Beinleiðis búskaparligir ágóðar síggjast aftur í starvsfólkunum, ið eru sett at fremja sjálva granskingina, menningina og nýskapanina, í tænastunum, tey nýta, í keypi av loyvum, í nýggjum fyritøkum, ið spretta burtur úr virkseminum og í sølu- og skattainntøkum frá nýggjum vørum og tænastum. Óbeinleiðis ágóðar síggjast aftur í fleiri og meira útbreiddum hentum tólum, mannagongdum og vitan, upplæring av eini størri og dugnaligari arbeiðsfjøld og í økta virðinum á framleiðsluni hjá fyritøkum, sum taka nýggju tøknina til sín. Harumframt umskipa gransking, menning og nýskapan samfelagið við nýggjum sambondum millum vinnu og vísindi, sum skapa nýggjar virðisketur og marknaðir.

2. Hines, P. (2017). ***Why fund research? A guide to why EU-funded research and innovation matters.*** Brussels, Belgium: Science Business Publishing Ltd, s. 4
3. OECD. (2015). ***Frascati Manual 2015: Guidelines for Collecting and Reporting Data on Research.*** The Measurement of Scientific, Technological and Innovation. Paris: OECD Publishing, s. 21



*Fyri bert 150 árum síðan var kertiljósið høvuðskeldan til manngjørt ljós. Stór framstig vóru longu tá gjørd við menningini av kertiljósinum. Men sama hvussu nógv vit høvdu granskað í kertiljósinum, hevði tað ongantíð givið okkum ljósperuna. Til tess var tørvur á grund-gransking.*[4]

Rolf Heuer, fyrrverandi aðalstjóri í CERN,
evropeiska felagsskapinum fyri kjarnorkugransking

*Heimliga granskingin og fíggingin av henni er ein íløga, sum rindar seg fleirfaldað aftur uttanífrá.*

Á hægri útbúgvingarstovnum kemur gransking teimum lesandi til góðar, tí hon lyftir støðið á undirvísingini. Umframt at skapa nýggja vitan, gevur ein ph.d.-verkætlan samfelagnum ein nýggjan granskara, ið hevur ognað sær førleikar og amboð til at fremja gransking á altjóða støði og undirvísa á hægri lærustovni. Ein ph.d.-útbúgving er eisini eitt av krøvunum til at gerast vegleiðari hjá øðrum ph.d.-lesandi og soleiðis víðkast stovnurin, fær samband við aðrar stovnar og harvið fara ringarnir víða.

Alment fíggjað gransking, menning og nýskapan eru eisini lykilin til at røkka týdningarmiklum málum, hvørs virði ikki er so lætt at viga og máta. Til dømis at slóða fyri bygnaðarbroytingum til frama fyri einum vitanartyngri búskapi við dygdarstørvum og øktum altjóða kappingarføri. Alt hetta er við til at betra okkara lívskor og styrkja okkara fólkaræði, og at tryggja samfelagið móti minkandi fólkatali og skeivum aldurs- og kynsbýti í framtíðini.

Ofta er tørvur á at byrja við grundgransking – grundleggjandi, leitandi, váðafúsari gransking, ið kann geva óvæntaði úrslit, ið lata upp fyri nýggjum marknaðum. Grundgransking fer fram í stórari frástøðu frá marknaðinum, og tað ger hana lítið lokkandi fyri privatar íleggjarar, sum oftast arbeiða við stuttum skotbrái. Tað kunnu ganga áratíggju, áðrenn úrslitini frá henni kunnu brúkast til nýskapan við peningaligum avkasti. Eisini er trupult at spora virðið á henni, tí vitanin verður spreidd út í samfelagið sum almannagagn. Tílíkir vitanarlekar eru sum oftast ágóðar fyri geirar, sum í stóran mun hava óbeinleiðis men grundleggjandi samband við búskaparligan vøkstur, til dømis útbúgvingar- og heilsugeirin.

## 1.3 Hví altjóða samstarv um gransking, menning og nýskapan

Føroyar eru lítlar, og londini kring okkum kunnu útinna nógvar ferðir meira innan gransking, menning og nýskapan. Við altjóða samstarvi fáa vit atgongd til nýggja vitan.

Tá vit brúka vitan frá øðrum, hava vit eisini skyldu at geva vitan aftur, og umheimurin hevur eisini tørv á servitan, sum bara føroyingar kunnu veita.

Á økjum, har vit hava eina serliga støðu – ein natúrligan kappingarfyrimun – t.d. hav, heilsa, mentan og samfelag, kunnu vit veruliga gera vart við okkum á altjóða pallinum.

Eisini á øðrum økjum kunnu vit gera vart við okkum, hóast vit eru lítil og fjarskotin. Eitt dømi um hetta er gransking í heilsufótbólti, ið hevur altjóða áhuga, hóast hon er staðsett í Føroyum.

Tá vit kunnu vísa á førleikar og dygdir her heima, fáa vit betri atgongd til útlendska fígging og netverk. Heimliga granskingin og fíggingin av henni er sostatt eisini ein íløga, sum rindar seg fleirfaldað aftur uttanífrá.

4. Hines, P. (2017). ***Why fund research? A guide to why EU-funded research and innovation matters.*** Brussels, Belgium: Science Business Publishing Ltd, s. 10

# 2. Støðulýsing

Vit hava enn eingi formlig hagtøl, og støðulýsingin er tí grundað á vitan og tøl, sum Granskingarráðið kann veita.

## 2.1 Granskingarstovnar og undirstøðukervi

Nógvir almennir stovnar eru í Føroyum, ið hava gransking sum eitt av sínum høvuðsendamálum. Fleiri stovnar eru eisini, sum umsita skráir og dátur, ið verða brúktar sum grundarlag fyri gransking, og nógvir av hesum stovnum hava eisini aðrar uppgávur sum at kunna og ráðgeva landsins myndugleikum um ávís viðurskifti. Flestu stovnarnir hava umfatandi samstarv við útlendskar granskingarstovnar um felags verkætlanir.



Vitanin um økið kring Føroyar er vaksin nógv seinnu árini

# Bygnaður

Niðanfyri er yvirlit yvir granskingar- og undirstøðustovnar og stuðulsskipanir til gransking, menning og nýskapan. Hesi eru skipað undir ymisk aðalráð og hava umframt granskingar- og stuðulsuppgávur fleiri aðrar myndugleikauppgávur.

Sambært málsøkjabýtinum hjá landsstýrinum frá 2022 hevur Barna- og útbúgvingarmálaráðið ábyrgd av vísinda- og granskingarmálum, Heilsumálaráðið hevur ábyrgd av heilsugranskingarmálum og Fiskivinnu- og samferðslumálaráðið ábyrgd av fiskirannsóknum og -gransking.

Altjóða sáttmálar og avtalur um gransking, menning og nýskapan hoyra til aðalráðið við ábyrgd fyri viðkomandi málsøki.

Í sambandi við skipan av landsstýri í 2022  vórðu fleiri stovnar fluttir til nýggj aðalráð.



# GRANSKINGARSTOVNAR

**Fróðskaparsetrið**
Fróðskaparsetur Føroya er okkara universitet, har gransking og undirvísing eru kjarnin í virkseminum. Granskingin hevur til endamáls at menna vísindaliga stigið á Fróðskaparsetrinum og í landinum.

**Fimm deildir eru á Fróðskaparsetrinum:**

- Føroyamálsdeildin
- Søgu- og samfelagsdeildin
- Náttúruvísindadeildin
- Deildin fyri Heilsu- og sjúkrarøktarvísindi
- Námsvísindadeildin

Granskingarverkætlanir eru knýttar at øllum deildum, og flestu deildir hava fleiri ph.d.-lesandi. Granskingarvirksemið fer ofta fram í samstarvi við vísindafólk á granskingarstovnum í Føroyum og á útlendskum stovnum, serliga á universitetunum í næstu grannalondunum. Tilsamans 164 starvsfólk eru á Fróðskaparsetrinum. 68 starvsfólk arbeiða heilt ella partvís við gransking.

**Havstovan**
Havstovan granskar og ger kanningar av føroyskum havumhvørvi og tí livandi tilfeingi, har er, og ráðgevur og kunnar landsins myndugleikar og almenning um hesi viðurskifti. Fleiri granskingarverkætlanir verða framdar í samstarvi við føroyskar og útlendskar granskingarstovnar. Tilsamans 33 starvsfólk eru á Havstovuni. 19 arbeiða heilt ella partvís við gransking.

**Fiskaaling**
Fiskaaling er alment partafelag, ið granskar, mennir og ráðgevur um aling av vatnlivandi djórum og plantum og biotøkni. Fiskaaling veitir eisini tænastur, sum alivinnan kann gagnnýta í alivirkseminum. Fleiri granskingarverkætlanir verða framdar í samstarvi við føroyskar og útlendskar granskingarstovnar og við fyritøkur. Tilsamans 32 starvsfólk eru á Fiskaaling. 18 arbeiða heilt ella partvís við gransking.

**Granskingareindin í Sjúkrahúsverkinum**
Granskingareindin í Sjúkrahúsverkinum er nýstovnað eind, sum skal verða karmur um heilsugransking í Føroyum. Hetta er ein samanlegging av granskingarpartinum av Deildini fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu og granskingarvirkseminum á Landssjúkrahúsinum og Ílegusavninum. Fleiri granskingarverkætlanir verða framdar í samstarvi við føroyskar og útlendskar granskingarstovnar. Tilsamans 11 starvsfólk eru í Granskingareindini.  9 arbeiða heilt ella partvís við gransking.

**Jarðfeingi**
Jarðfeingi fyrisitur, granskar, ráðgevur og breiður út kunnleika um kolvetni og jarðfrøðilig náttúruvirði. Jarðfeingi granskar í jarðfrøði og náttúrulandafrøði á landi, á havbotninum og í undirgrundini. Fleiri granskingarverkætlanir verða framdar í samstarvi við føroyskar og útlendskar granskingarstovnar. Tilsamans 15 starvsfólk eru hjá Jarðfeingi. 10 arbeiða heilt ella partvís við gransking.

**Heilsufrøðiliga Starvsstovan**
Heilsufrøðiliga Starvsstovan er eftirlits- og vitanarstovnur fyri mat og djór í Føroyum. Fleiri granskingarverkætlanir verða framdar í samstarvi við føroyskar og útlendskar granskingarstovnar. Tilsamans 54 starvsfólk eru á Heilsufrøðiligu Starvsstovuni. 5 arbeiða heilt ella partvís við gransking.

**Umhvørvisstovan**
Umhvørvisstovan veitir tænastur og granskar innan náttúru og umhvørvi. Harumframt umsitur Umhvørvisstovan matrikul- og verndarfyrisiting, land- og sjókort. Fleiri granskingarverkætlanir verða framdar í samstarvi við føroyskar og útlendskar granskingarstovnar. Tilsamans 70 starvsfólk eru á Umhvørvisstovuni. 5 arbeiða heilt ella partvís við gransking, og 3 við nýmenning.

**Búnaðarstovan**
Búnaðarstovan fyrisitur alla almenna jørð, ið ikki er skrásett sum ogn hjá øðrum almennum stovni. Virksemið á Búnaðarstovuni fevnir eisini um landbúnaðarráðgeving, landbúnaðarroyndir og gransking. Nakrar granskingarverkætlanir verða framdar í samstarvi við føroyskar og útlendskar granskingarstovnar. Tilsamans 13 starvsfólk eru á Búnaðarstovuni. 3 starvsfólk arbeiða heilt ella partvís við gransking.

**Tjóðsavnið**
Tjóðsavnið savnar, skrásetur, varðveitir og granskar í náttúru- og mentanarvirðum landsins. Fleiri granskingarverkætlanir verða framdar í samstarvi við føroyskar og útlendskar granskingarstovnar. Tilsamans 42 starvsfólk eru á Tjóðsavninum. 18 starvsfólk arbeiða heilt ella partvís við gransking.

**Tjóðskjalasavnið**
Tjóðskjalasavnið varðveitir skjøl, ið hava søguligt virði og fyrisitingarligan og rættarligan týdning fyri borgarar og myndugleikar. Tilsamans 9 starvsfólk eru á Tjóðskjalasavninum. 2 arbeiða heilt ella partvís við gransking.

**Sjókovin**
Sjókovin er ein privatur, sjálvstøðugur, ikki-vinnuligur granskingargrunnur. Endamál grunsins er at stimbra burðardygga menning og nýskapan í føroyskum sjófeingisvinnum við at veita vitanartænastur gjøgnum gransking og luttøku í altjóða verkætlanum. Fleiri granskingarverkætlanir verða framdar í samstarvi við føroyskar og útlendskar granskingarstovnar og fyritøkur. Tilsamans 5 starvsfólk eru hjá Sjókovanum.


**Kanningar og innsavning av tilfari eru ein stórur partur av granskingararbeiðinum**

# GRANSKINGARUNDIRSTØÐUKERVI

**Fólkaheilsustýrið**
Fólkaheilsustýrið mennir og umsitur heilsuskráir, ið kunnu vera undirstøðukervi til heilsugranskíng. Fólkaheilsustýrið fór til verka 1. januar 2023 og er ein samanlegging av fyrrverandi Fólkaheilsuráðnum, Ílegusavninum, FarGen og Deildini fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu undantikið granskingarpartin, sum er fluttur til Granskingareindina í Sjúkrahúsverkinum.

**Landsbókasavnið**
Landsbókasavnið er tjóðbókasavn, høvuðsbókasavn og vísindabókasavn. Savnið savnar allar føroyskar bókmentir og so mikið sum gjørligt av bókmentum um Føroyar. Tilsamans 20 starvsfólk eru á Landsbókasavninum. 1 arbeiðir við gransking.

**iNOVA**
Granskarasetrið hevur sum endamál at styrkja vísindaliga undirstøðukervið í Føroyum. Granskarasetrið er úrslit av samstarvi millum privatar og almennar fyritøkur, sum granska undir sama taki. Granskarasetrið hevur nýmótans starvsstovur, framkomin tól og skrivstovur. Tilsamans 30 fólk frá granskingarstovnum og fyritøkum arbeiða heilt ella partvís á iNOVA, av hesum eru 17 granskarar og 6 íverksetarar.




**Íløgur í granskingarundirstøðukervi eru fortreyt fyri gransking**




**Fæið úr Sjúkrakassagrunninum setti ferð á heilsugransking í Føroyum**

## 2.2 Ph.d.-lestur

Fróðskaparsetrið, granskingarstovnarnir, almenna fyrisitingin og vinnan hava tørv á vælútbúnum fólki til ymsu granskingaruppgávurnar, sum arbeitt verður við. Hetta eru í stóran mun fólk við ph.d.-útbúgving. Talan kann eisini vera um annað doktaraheiti, til dømis DBA, dr.phil., dr. scient. og dr.med.

Granskingarráðið hevur, eins og almennar stuðulsskipanir til gransking í øðrum londum, lagt stóran dent á at stuðla ph.d.-verkætlanum. Hetta verður mett sum ein kjarnauppgáva, serliga tí stovnarnir og fyritøkurnar oftast ikki sjálvi hava fíggjarorku til at seta nóg nógv fólk í ph.d.-útbúgvingarstørv í mun til tann tørv, tey hava á fólki til endurnýggjan og víðkan av starvsfólkahópinum.

Tað eru fleiri øki, sum als ikki hava nóg nógvar ph.d.-kandidatar til at lúka nútíðartørvin. Serliga Fróðskaparsetrið, sum hevur víðkað og styrkt útbúgvingarvirksemið munandi seinastu 10 árini, hevur havt og hevur framvegis ein nógv størri tørv á ph.d.-kandidatum á summum økjum, enn vit klára at klekja í løtuni.

Granskingarráðið fær á hvørjum ári væl fleiri skikkaðar umsóknir um stuðul til ph.d.-verkætlanir, enn møguligt er at stuðla við árligu játtanini. Stuðulin, sum verður latin hvørjari einstakari verkætlan, er eisini minkaður lutfalsliga seinnu árini vegna vantandi fíggjarorku. Hetta skapar eitt størri putlispæl fyri kandidatar og stovnar, tá ið neyðuga fíggingin skal fáast til vegar.

### Ph.d.-prógv í eitt 10 ára-skeið

Sambært skrásetingum hjá Granskingarráðnum hava í minsta lagi 122 fólk í Føroyum og føroyingar uttanlands lokið ph.d.-prógv frá 2013-2022. Av hesum hevur Granskingarráðið stuðlað 52 av verkætlanunum í størri ella minni mun. Í fleiri førum er ph.d.-verkætlanin fíggjað uttanlands burturav, og kandidaturin hevur einki samband havt við Føroyar uttan síni ættarbond.

Talið av ph.d.-kandidatum er vaksið munandi hetta skeiðið samanborið við 2003-2012, tá 85 luku ph.d.-prógv, og 1993-2002, tá 32 luku ph.d.-prógv.

Av teimum 122 verkætlanunum hava 24 lokið ph.d.-prógv á Fróðskaparsetrinum, meðan hini hava lokið prógv í Norðurlondum (76) ella aðrastaðni (22). Í 23 førum hava ph.d.-lesandi arbeitt á føroyskum granskingarstovnum, men verið innskrivað við útlendsk universitet.

Fakliga er tríbýtt millum hug- og samfelagsvísindi, heilsuvísindi og náttúruvísindi & tøkni. Heilsuvísindaøkið hevur tikið seg skjótt fram seinnu árini. Granskingarráðið metir, at stuðulin frá Sjúkrakassagrunninum er høvuðsorsøkin til, at tað hevur borið til at sett fleiri fólk við á økinum.

Í 10 ára skeiðinum frá 2013-2022 hava 52 menn og 70 kvinnur lokið ph.d.-prógv.[5] Hetta er eisini ein stór broyting í mun til undanfarnu 10 árini frá 2003-2012, tá 48 menn og 37 kvinnur luku ph.d.-prógv. Í árunum 1993-2002 luku 24 menn og 8 kvinnur ph.d.-prógv.

**Ph.d. er stytting fyri philosophiae doctor (doktari í filosofi). Hetta er vanliga ein 3 ára granskaraútbúgving oman á masterútbúgving. Hon er í dag kravd fyri at kunna fáa starv sum granskari á universitetum og granskingarstovnum. Eisini fleiri virkir, serliga tey, sum arbeiða við menning av nýggjum vørum og tænastum, seta fólk við ph.d.-útbúgving í starv.**

**Talan er um eina meira sjálvstøðuga útbúgvingartíð enn mastertíðin við bæði útbúgving og arbeiði. Tann ph.d.-lesandi skal savna dátur og granska eitt ávíst evni við vegleiðing frá royndum granskarum, eitt slag av meistara-læru. Haraftrat er krav um at taka fleiri akademisk skeið, at undirvísa universitetslesandi, at vistast í øðrum granskingarumhvørvi og at útgeva úrslit í vísindaligum tíðarritum og fyri almenninginum.**

5. Uppgerðin fevnir um øll fólk í Føroyum og føroyingar uttanlands við ph.d.-útbúgving. Tey eru ikki sambærlig við altjóða hagtøl, sum bert telja fólk við ph.d.-útbúgving, ið eru 24-64 ár, við.

# Ph.d.-prógv seinastu 10 árini

**Býtt á lond 2013-2022**




**Býtt á fakøki 2013-2022**




**Ph.d.-prógv 2013-2022**





**Havtilfeingið er margfelt, og møguleikarnir at gagnnýta tað eru stórir**

## 2.3 Stuðulsskipanir

Stuðul verður latin til gransking, menning og nýskapan úr fleiri ymiskum føroyskum og útlendskum grunnum.

### Almennar skipanir

Granskingarráðið umsitur Grunnin fyri gransking, menning og nýskapan. Karmarnir um grunnin eru ásettir í løgtingslóg nr. 89 frá 7. juni 2020 um ráðgeving og stuðul til gransking, menning og nýskapan.

Fleiri stuðulsskipanir eru í grunninum:

**Stuðul til gransking**
Granskingarráðið fær á hvørjum ári eina játtan á fíggjarlógini at luta út til stuðul til gransking.

7,5 mió. kr. vóru tøkar til stuðul í 2022. Síðani 2002 er játtaður stuðul til umleið 260 verkætlanir úr hesi skipan. Stuðul verður veittur eina ferð um árið. Umsóknarfreistin er 15. februar.

**Stuðul til vísindaligar útgávur**
Stuðul til vísindaligar útgávur verður latin frá fæi úr Eik Vísindagrunninum, sum Granskingarráðið fekk í 2015. Stuðul verður fyrst og fremst latin til útgávu av javnlíkamettum (peer reviewed) vísindaverkum um føroysk evni. Granskingarráðið umsitur stuðulsskipanina.

**Stuðul til Arbeiðsmarknaðarátøk**
Stuðul til Arbeiðsmarknaðarátøk verður latin frá fænum hjá avtikna Frítíðargrunninum, ið var 10 mió. kr. Stuðul verður latin til smærri kanningar og granskingarverkætlanir, sum snúgva seg um føroyska arbeiðsmarknaðin.

Granskingarráðið umsitur stuðulsskipanina. Stuðul verður veittur eina ferð um árið. Umsóknarfreistin er 15. februar.

**Stuðul til Havgransking í Norðuratlantshavi**
Havgransking í Norðuratlantshavi er granskingarskrá, ið danska stjórnin fíggjar, og sum Granskingarráðið umsitur. Í tíðarskeiðinum 2020-2023 vóru 25,5 mió. kr. settar av til skránna á donsku fíggjarlógini. Endamálið við granskingarskránni er at skapa økta vitan um havumhvørvið í Norðuratlantshavi og at menna samstarvið millum Føroyar, Grønland og Danmark um havgransking.

### Aðrar almennar skipanir liggja hjá aðalráðum og stovnum

**Fiskivinnuroyndir**
Løgtingið játtar á hvørjum ári stuðul til Fiskivinnuroyndir. Endamálið er at stuðla gransking og menning í fiskivinnuni. Skipanin verður umsitin av Fiskimálaráðnum. Játtanin hevur sveiggjað seinastu árini frá 4 til 6,5 mió. kr. Stuðul verður veittur eina ella tvær ferðir um árið.

**Vinnuframi**
Løgtingið játtar á hvørjum ári stuðul til Vinnuframa, ið veitir stuðul til til nýskapandi vinnuligar verkætlanir, sum skapa eitt meira fjøltáttað og burðardygt vinnulív. Í 2022 var játtanin 3 mió. kr. Søkjast kann um stuðul alt árið.

**Stuðul til verkætlanir um alternativa orku**
Umhvørvis- og vinnumálaráðið veitir stuðul til verkætlanir um alternativa orku, ið útvega nýggja vitan um orkumøguleikar úr undirgrundini, t.d. flógvar keldur og djúpboringar. Verkætlanirnar skulu fremjast í samstarvi við Jarðfeingi ella Umhvørvisstovuna. Í 2022 var játtanin 1,8 mió. kr. Stuðul verður veittur eina ferð um árið.

## Privatar stuðulsskipanir

**Føroyagrunnurin**
Føroyagrunnurin frá 1971 er vinnurekandi grunnur, sum millum annað hevur til endamáls at veita stuðul til ídnaðarroyndir innan fiskivinnu, handverk, ídnað og marknaðarkanningar.

**Betri stuðul**
Betri stuðulsgrunnurin letur stuðul til gransking. Grunnurin stuðlar serliga gransking, ið kann metast at vera sjúkufyribyrgjandi, skaðafyribyrgjandi ella tryggleikaskapandi í Føroyum. Dentur verður lagdur á tíðaravmarkaðar verkætlanir, ið gera ítøkiligan mun, heldur enn grundgransking.

## Útlendskar stuðulsskipanir

**NordForsk**
NordForsk er stovnur undir Norðurlendska Ráðharraráðnum, sum stuðlar norðurlendskum samstarvi um gransking og granskingarundirstøðukervi. Føroyar hava sjálvstøðugan limaskap í NordForsk.

**Nordic Innovation**
Nordic Innovation er stovnur undir Norðurlendska Ráðharraráðnum, sum stuðlar íverksetan, nýskapan og kappingarføri hjá norðurlendskum fyritøkum. Føroyar hava eygleiðarastøðu í Nordic Innovation.

**Nordic Energy Research**
Nordic Energy Research er stovnur undir Norðurlendska Ráðharraráðnum, sum stuðlar samstarvi um gransking í orku og orkupolitikki. Føroyar hava sjálvstøðugan limaskap í Nordic Energy Research.

**Northern Periphery and Arctic Programme**
Northern Periphery and Arctic Programme (NPA) veitir stuðul til millumtjóða samstarvsverkætlanir í Føroyum, Íslandi, Grønlandi og pørtum av Noregi, Svøríki, Finnlandi, Írlandi, Norðurírlandi og Skotlandi. Endamálið er at menna økini við at stuðla nýskapan, íverksetan og vakstrarmøguleikum á burðardyggan hátt. Skipanin er fíggjað av ES.

**NORA - Norrønt Atlantssamstarv**
NORA - Norrønt Atlantssamstarv er millumtjóða samstarv undir Norðurlendska Ráðharraráðnum, ið fevnir um Grønland, Ísland, Føroyar og Strandanoreg. NORA stuðlar verkætlanum, ið økja um samstarvið millum vinnu-, granskingar- og menningarfyritøkur tvørtur um landamørkini.

**Horizon Europe**
Horizon Europe er rammuskráin fyri gransking, menning og nýskapan hjá ES fyri 2021-2027. Føroyar hava atlimaskap í Horizon Europe, og føroyskir granskarar, stovnar og fyritøkur kunnu søkja um stuðul og luttaka í evropeiskum verkætlanum á jøvnum føti við samstarvsfelagar í ES-londum og øðrum londum, ið hava samstarvsavtalur við ES.

**COST – Altjóða netverk**
COST - European Cooperation in Science and Technology – stuðlar granskingar- og nýskapanarnetverkum innan øll vísindalig og tøknilig øki. Serligur dentur verður lagdur á at menna øki og evni, sum enn ikki hava fingið fótafesti. COST og ES-nevndin hava tætt samstarv. Føroyar hava limaskap í COST.



Tað krevst nógv telduorka til gransking, her til greining av sildagenominum

## Avtiknar stuðulsskipanir

Granskingarráðið hevur umsitið fleiri stuðulsskipanir, sum ikki eru virknar longur:

**Sjúkrakassagrunnurin** stuðlaði átøkum og verkætlanum, sum kundu menna heilsuøkið í Føroyum. Skipanin varð stovnsett við peningi, ið sjúkrakassarnir kring landið áttu, tá teir vórðu avtiknir.

**Vinnulig ph.d.-gransking** veitti stuðul til vinnuligar ph.d.-verkætlanir. Skipanin varð stovnsett við peningi úr Minningargrunninum fyri Dánjal Niclasen.

**Stuðul til Horizon umsóknir** varð latin til teirra, sum arbeiddu við ítøkiligum umsóknum til Horizon granskingarskránna. Skipanin varð niðurløgd vegna vantandi fígging. Arbeitt verður við at fáa nýggja fígging og tillaga skipanina.

**Stuðul til COVID-19 átøk** varð latin til granskingarverkætlanir í sambandi við COVID-19. Stuðulin kom frá Granskingargrunninum, Sjúkrakassagrunninum og fleiri vinnufyritøkum.

## 2.4 Altjóða samstarv

Altjóða samstarv um gransking, menning og nýskapan er avgerandi fyri at økja um møguleikar og menna føroyskar førleikar. Føroyar hava raðfest evropeiska samstarvið við luttøku í granskingarskránni Horizon Europe, sum letur upp fyri stórum nøgdum av bæði fígging og førleikum til stórar granskingar- og nýskapanarverkætlanir, eins og tað veitir atgongd til veitingarketur, ið vit ikki hava atgongd til annars. Økta kappingin um stuðul lyftir støðið á verkætlanum innan gransking, menning og nýskapan við luttøku frá fremstu granskarum og nýskaparum í Evropa. Samstarvið ger, at vitan og førleikar verða spjadd út um alt Europa og skapar netverk í hópatali.

Føroyar luttaka eisini í norðurlendskum granskingar- og menningarsamstarvi í Nordforsk, Nordic Innovation og Nordic Energy Research. Føroyar luttaka eisini í arktiskum granskingarsamstarvi og í granskingarátakinum hjá ST, "Havsins áratíggju". Harumframt hava føroyskar fyritøkur nógv sambond úteftir.

**Samstarv við Evropa**
Formliga samstarvið millum Føroyar og ES um luttøku í **evropeiskum rammuskráum** byrjaði í 2010, tá ið samstarvsavtalan um gransking kom í gildi. Samstarvið fevndi fyrst um luttøku í FP7 rammuskránni og síðani í Horizon 2020, sum víðkaði samstarvið til gransking, menning og nýskapan. Tann 24. mai 2022 varð sáttmálin millum Føroyar og ES um luttøku Føroya í **Horizon Europe** undirskrivaður.

Fleiri stovnar og fyritøkur í Føroyum hava fingið stuðul til verkætlanir frá ES. Føroyskir granskarar hava eisini fingið nógva beinleiðis og óbeinleiðis nyttu burtur úr at luttaka í evropeiskum samstarvi og í altjóða netverkum.

Føroyar guldu meira fyri at vera við í undanfarnu FP7 og Horizon 2020 avtalunum enn fingið varð burturúr í fíggjarligum stuðli. Í nýggja Horizon Europe sáttmálanum er gjaldsfrymilin broyttur, so tað er beinleiðis samband millum gjald og úrtøku.

**Horizon Europe** er grundað á tríggjar súlur og skipað við útboðum, sum eru í samsvari við politisku stevnumiðini hjá ES. Útboðini verða almannakunngjørd í arbeiðsskráum, har granskarin sjálvur velur sítt evni ella har evnið er fyrireikað frammanundan.

| Dygdarvísindi | Altjóða avbjóðingar og evropeiskt vinnuligt kappingarføri | Nýskapandi Europa |
|---|---|---|
| Evropeiska Granskingarráið (ERC) | **Tyssi**<br>• Heilsa<br>• Mentan og fevnandi samfelag<br>• Samfelagstrygd<br>• Talgilding, vinna og rúmd<br>• Veðurlag, orka og flytføri<br>• Matur, biobúskapur, náttúrutilfeingi, landbúnaður og umhvørvi | Evropeiska Nýskapanarráðið (EIC) |
| Marie Sktodowska-Curie virksemi | | Evropeiskar nýskapanarvistskipanir (EIE) |
| Granskingarundirstøðukervi | Partaløg og missiónir | Evropeiski stovnurin fyri nýskapan og tøkni (EIT) |
| **Widening-skráin og stuðul til Evropeiska Granskingarøkið (ERA)** | | |

**Í SÚLU 1 – Dygdarvísindi** – ber til at søkja um stuðul frá Evropeiska Granskingarráðnum (ERC) til fría gransking á øllum økjum, frá Marie Skłodowska-Curie Actions (MSCA) skipanini til víðariútbúgving hjá granskarum tvørtur um landamørk og geirar og frá Granskingarundirstøðukervinum til hentleikar, tilfar og tænastur.

**Í SÚLU 2 – Altjóða avbjóðingar og evropeiskt vinnuligt kappingarføri** – eru seks evnisbundnar skráir, sonevnd clusters ella tyssi, sum leggja dent á stórar altjóða avbjóðingar og leggja seg eftir at loysa ST Heimsmálini.  Hetta eru útboðini, sum føroyskir granskingarstovnar og fyritøkur sannlíkt hava størst áhuga í. Harumframt eru tvørgangandi partaløg og missiónir, har miðað verður eftir at loysa nakrar av størstu avbjóðingunum í heiminum í dag.

**Í SÚLU 3 – Nýskapandi Evropa** – verður dentur lagdur á nýskapan. Evropeiska Nýskapanarráðið (EIC) veitir nýggj sløg av váðafúsum stuðli og lánum til nýskapan. Nýskapanarvistskipanir stuðla samstarvi millum nýskaparar, og Evropeiski stovnurin fyri nýskapan og tøkni (EIT) savnar fremstu fyritøkur og útbúgvingar- og granskingarstovnar til tess at skapa dynamisk, tvørgangandi partaløg.

Horizon Europe hevur umframt súlurnar eisini eina 'Widening'-skrá, sum er ein serlig stuðulsskipan til lond, ið hava havt lutfalsliga lítla luttøku í Horizon-skránni. Hon fevnir millum annað um Føroyar.

Umframt Horizon Europe verkætlanir kunnu føroyingar eisini søkja um luttøku í **COST-netverkum**, sum hava sum mál at virka fyri slóðbrótandi vísindaligari menning, ið kann hava við sær nýggj hugskot og nýggja framleiðslu.

COST hevur avtalu við ES-nevndina og somu mál sum ES-nevndin um at menna lond, sum ikki avrika eins nógv og framkomnu londini í ES. Stórur dentur verður lagdur á at birta upp undir samstarv og flytføri millum londini.

Føroyar fingu limaskap í **COST** í november 2022. Tað gevur føroyskum granskarum rætt at luttaka í COST netverkum á jøvnum føti við onnur. Umframt netverk hevur COST millum annað verkstovur og tiltøk við denti á at menna førleikar og eggja til samstørv tvørturum fakøkir og landamørk.

**Samstarv við Norðurlond**
Føroyar fingu 1. januar 2023 sjálvstøðugan limaskap í stýrinum fyri **NordForsk**, sum fíggjar og stuðlar norðurlendskum samstarvi um gransking og granskingarundirstøðukervi og ráðgevur viðvíkjandi norðurlendskum granskingarpolitikki.

NordForsk hevur høvuðsskrivstovu í Oslo saman við Nordic Innovation og Nordic Energy Research. NordForsk stuðlar verkætlanum, ið verða mettar at geva norðurlendskt meirvirði. Verkætlanirnar skulu hava luttakarar úr minst trimum norðurlondum. Luttakarar úr Føroyum kunnu søkja á jøvnum føti við onnur.

Føroyar hava havt eygleiðarastøðu í stýrinum fyri NordForsk frá byrjan í 2005 til nú, vit hava fingið sjálvstøðugan limaskap. Næsta stigið á leiðini hjá Føroyum er at luttaka í átøkum hjá NordForsk við fígging til føroyskar luttakarar.



## Sterkt toymi spratt úr norðurlendskari verkætlan

Heidi S. Mortensen, lívfrøðingur, fór í 2022 undir eina ph.d.-verkætlan, sum er skipað í samstarvi við eina norðurlendska granskingarverkætlan, ið nevnist DigiHeart, sum Fiskaaling er við í, og sum verður fíggjað av NordForsk og limalondunum.

Ph.d.-verkætlanin skal avdúka, um æðrakálking í krúnulívæðrini er ein av høvuðsorsøkunum til, at alsamt meiri alilaksur doyr stutt eftir, at hann er avlúsaður.

Granskarar í DigiHeart-arbeiðsbólkinum hava arbeitt nógv við æðrakálking hjá alifiski, men eingin hevur veruliga kannað, um samband er millum æðrakálking og høga fellið við strongjandi handfaring.

Umframt at arbeiða á Fiskaaling er Heidi S. Mortensen nú innskrivað til ph.d.-lestur á Gøteborg Universiteti og hevur fimm vegleiðarar úr DigiHeart-verkætlanini úr Svøríki, Norra og Føroyum.

Netverkið, sum er bygt upp úr DigiHeart-verkætlanini, hevur stórt virði fyri allar partar. Eisini vinnan er við í verkætlanini.

Føroyar hava eisini sjálvstøðugan limaskap í stýrinum fyri **Nordic Energy Research.** Føroyar hava enn eygleiðarastøðu í **Nordic Innovation**, her verður arbeitt fyri at fáa sjálvstøðugan limaskap eisini.

### Arktis

Føroyar hava í mong ár verið virknar í millumtjóða granskingarsamstørvum, sum viðvíkja Arktis. Føroyar skrivaðu í 2017 undir millumtjóða sáttmála undir Arktiska ráðnum um at styrkja granskingarsamstarvið í Arktis. Nógv viðkomandi vitan og stórar dátumongdir eru í Føroyum, ið kunnu vera eitt virðismikið íkast til gransking og vitanarmenning í Arktis. Fakfólk frá føroyskum vitanarstovnum geva í dag týðandi íkast til granskingarsamstarvið sambært strategiskari virkisætlan fram til 2030.

### Havsins áratíggju

ST hevur gjørt av, at árini 2021-2030 skulu vera Havsins áratíggju fyri burðardyggari menning.

Føroyar eru síðani 7. februar 2023 partur av felagsnevnd fyri Danmark, Føroyar og Grønland fyri Havsins áratíggju  og luttaka í hesum sambandi í fleiri arbeiðsbólkum.

Endamálið við Havsins áratíggju er at skapa felags karmar kring havvísindi, sum kunnu stuðla londum at røkka heimsmálunum fyri burðardyggari menning í 2030. Átøk skulu setast í verk at fáa eitt reint, burðardygt og mótstøðuført hav. Hvørt landið sær skal røkka málunum við støði í egnum veruleika og raðfestingum.

Arbeitt verður við at skipa føroyska arbeiðið við egnari tjóðarnevnd við umboðum fyri stjórnarráð, granskingarumhvørvið og aðrar viðkomandi partar, sum kann samstarva við aðrar tjóðarnevndir í millumtjóða samstarvi. Føroyska tjóðarnevndin skal eftir ætlan samskipa arbeiðið og semjast um, hvørji átøk kunnu gerast partar av Havsins áratíggju.

## 2.5 Hagtøl

Granskingarráðið fór í februar 2022, í tøttum samstarvi við Hagstovu Føroya, undir at kanna, hvat krevst fyri at savna hagtøl um gransking, menning og nýskapan í Føroyum. Forkanningin[6] varð liðug í september sama ár og løgd fram fyri Uttanríkis- og Mentamálaráðið við umbøn um játtan til at byrja regluliga hagtalsinnsavning. Mælt varð til at menna hagtølini eftir altjóða leisti.[7]

*Hagtølini skulu lýsa, hvør granskar, mennir og nýskapar í tí almenna og í vinnuni*

Hagtølini skulu millum annað lýsa, hvør granskar, mennir og nýskapar í tí almenna og í vinnuni. Kannað verður, hvussu nógv granskingar-, menningar- og nýskapanarvirksemi er, hvussu stórar útreiðslur eru til virksemið, hvussu nógv ársverk fara til tað, og hvør fíggjar tað. Harumframt verður kannað, hvat slag av nýskapan og gransking fer fram (grundgransking, nýtslugransking og menningararbeiði), hvørjum økjum granskað verður í, hvat endamálið er o.s.fr.

Í fyrsta umfari er neyðugt at menna undirstøðukervið, ið krevst fyri at framleiða hagtølini, t.e. spurnakanningar, innsavningarskipan og skipan til viðgerð og greining av dátum. Menningararbeiðið, sum byrjaði í februar 2023, er mett at taka tólv mánaðir hjá einum hagfrøðingi og sjey mánaðir hjá einum KT-mennara. Samlaða menningararbeiðið fer fram yvir tvey ár og inniber partvísa framleiðslu av hagtølum bæði árini. Tá ið menningararbeiðið er liðugt, kann farast undir fulla framleiðslu av hagtølum um gransking, menning og nýskapan í Føroyum. Eftir ætlan skulu hagtølini savnast inn, greinast og miðlast árliga.

6. Heinesen, R. (2022). Hagtøl eftir altjóða leisti - Gransking og Menning. Heinesen, R. (2022). Hagtøl eftir altjóða leisti - Nýskapan.
7. OECD. (2015). Frascati Manual 2015: Guidelines for Collecting and Reporting Data on Research. The Measurement of Scientific, Technological and Innovation. Paris: OECD Publishing.
OECD/Eurostat. (2018). Oslo Manual 2018: Guidelines for Collecting, Reporting and Using Data on Innovation, 4th Edition. The Measurement of Scientific, Technological and Innovation Activities. Paris/Eurostat, Luxembourg: OECD Publishing.



Grundgransking í føroyskari jarðfrøði letur hurðina upp fyri samstarvi bæði yvir um hav og heilt upp á okkara nærmastu gongustjørnu

# 3. Meting av almennu gongdini

Ráðið fyri gransking, menning og nýskapan hevur samskift við granskingarstovnar og nýskapandi fyritøkur fyri at fáa eina meting av almennu gongdini viðvíkjandi gransking, menning og nýskapan í Føroyum. Ráðið hevur sett seg í samband við allar almennar granskingarstovnar í landinum umframt eina røð av fyritøkum, sum kundu eyðmerkjast sum nýskapandi í sínum virksemi.

Stovnar, ið svaraðu fyrispurningum frá Ráðnum, vóru Fróðskaparsetur Føroya, Landssjúkrahúsið, Umhvørvisstovan, Fiskaaling, Havstovan, Deildin fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu, Jarðfeingi og iNOVA. Fyritøkur, ið svaraðu, vóru Bakkafrost, JT-Electric, Ocean Rainforest, Sjókovin, SMJ, TARI og Varðin Pelagic.

*Serfrøðin verður bundin at einstaka granskaranum og ikki kjølfest í nøkrum stovni*

Granskingarstovnar og fyritøkur fingu seks spurningar, sum tey vórðu biðin um at svara skrivliga. Spurningarnir vóru:

1. Hvørjar manglar/forðingar síggja tit á tykkara øki?
2. Hvat riggar væl á tykkara øki?
3. Hvørjar granskarar mangla tit til tær verkætlanir, tit kundu hugsað tykkum?
4. Vanta onkrar útbúgvingar (fakultet) í Føroyum fyri at fáa tey fólkini, ið tykkum tørvar?
5. Hvussu tryggja vit burðardygga/áhaldandi gransking?
6. Hvørjar visjónir hava tit fyri gransking, menning og nýskapan í Føroyum?

Nakrir stovnar og fyritøkur vórðu eisini boðin á fund við Ráðið, har tosað varð um umstøður at granska, menna og nýskapa í Føroyum og samstarv millum granskarar og mennarar.

Millum afturvendandi evnini vóru serliga:

- Vantandi oyramerkt tíð til áhaldandi gransking, menning og nýskapan
- Vantandi fígging
- Vantandi samskipan/samstarv

Evnini eru tengd at hvør øðrum. Meira tíð til gransking, menning og nýskapan er treytað av øktari fígging, og betri samskipan og samstarv høvdu óivað spart bæði tíð og pening.

*Niðanfyri er tikið samanum sjónarmiðini frá luttakandi stovnum og fyritøkum um almennu gongdina viðvíkjandi gransking, menning og nýskapan í Føroyum. Hesi umboða ikki sjónarmiðini hjá Ráðnum, hóast tey umskarast á nógvum økjum.*

## 3.1 Vantandi fígging og oyramerkt tíð

Vit klekja alsamt fleiri ph.d.-arar í Føroyum, men tað vísir seg at vera trupult at uppstiga serfrøðingaøkið og viðlíkahalda tað vegna eitt ov lítið granskingarumhvørvi og sera avmarkaðar játtanir, sum ofta verða veittar til einstakar verkætlanir og ikki til áhaldandi fígging. Á henda hátt verður serfrøðin bundin at einstaka granskaranum og ikki kjølfest í nøkrum stovni.

Arbeiðið á granskingarstovnum snýr seg ikki bert um gransking, men gransking eigur at vera ein aðaluppgáva á granskingarstovnum, ið verður raðfest samsvarandi. Gransking endar javnan sum ein eyka uppgáva í aðru røð eftir undirvísing, heilsurøkt, framleiðslu og annað. Orsøkin er ikki vantandi vilji, men vantandi arbeiðsmegi, vantandi oyramerkt tíð til gransking og vantandi undirstøðukervi.

Økt játtan til granskingarstovnar kundi tryggjað, at hesir kunnu hava granskingarstarvsfólk í føstum starvi. Tá ið ph.d.-verkætlanir eru lidnar, hevði verið ynskiligt, at ph.d.-arar í størri mun enn nú høvdu møguleika at fara undir framhaldandi gransking.




Hjá smærru fyritøkunum sæst sami trupulleiki, at tíð og fíggjarlig orka í ov lítlan mun røkka til gransking, menning og nýskapan. Hóast fyritøkur brúka nógva orku, tíð og pening til gransking og nýskapan fyri at mennast, megna tær ofta ikki at koma víðari við hugskotum og kanningum vegna vantandi fíggjarliga orku.

Ein afturvendandi trupulleiki í sambandi við fyrsta stigið hjá nýskapandi íverksetum er vantandi fræ-kapitalur, sum er sera váðafúsur. Hetta byrjanarstigið verður eisini rópt "Deyðadalurin".

Deyðadalurin lýsir tíðarbilið frá tí at nýggj vøra ella tænasta er skapað og útgivin, til sølan av henni byrjar at skapa inntøkur. Hetta tíðarbilið hava fyritøkur vanliga brúkt alla fyribils fígging. Fyri at yvirliva deyðadalin er tørvur á at finna støðuga fígging, áðrenn íløgupeningurin er uppbrúktur. Tað eru fá virki og grunnar, ið vilja leggja pening í hjá íverksetum á hesum stigi, áðrenn fyritøkan hevur prógvað sítt virði. Hjá nógvum íverksetum endar nýskapanin tí við at fara fyri skeyti.

Avbjóðingin hjá íverksetum kann samanlíknast við trupulleikan við at finna fígging til grundgransking. Eins og við grundgransking síggjast ágóðarnir frá nýskapan ofta ikki, fyrr enn ávís tíð er runnin, men teir kunnu, tá ið avtornar, kortini vísa seg at vera stórir.

Útbygging og menning av undirstøðukervi til starvsstovukanningar í Føroyum eru íløgur, sum kunnu spara tíð og pening hjá granskingarstovnum og fyritøkum, tí royndir, sum í dag verða sendar av landinum, kundu verið avgreiddar her heima. Skipanin við iNOVA, har felags starvsstovuútgerð varð fingin til vegar, var ein byrjan, men fíggjarliga grundarlagið er ov veikt, og føst starvsfólk eru ikki at reka og viðlíkahalda tólini.

Tørvur er á hægri raðfesting og eini yvirskipaðari landsfevnandi strategi fyri gransking, menning og nýskapan við samsvari millum ætlan og fígging. Neyðugt er við hægri játtan og betri stuðulsmøguleikum til størri og smærri verkætlanir bæði hjá almennum stovnum og privatum fyritøkum.

”

*Tørvur er á hægri raðfesting og eini yvirskipaðari landsfevnandi strategi fyri gransking, menning og nýskapan við samsvari millum ætlan og fígging*

## 3.2 Meira samstarv og betri samskipan

Einstøku stovnarnir og serliga smærru fyritøkurnar høvdu fingið gagn av at verið partur av einum størri granskingar-, menningar- og nýskapanarfelagsskapi við meira samstarvi um verkætlanir.

Flestu stovnar og fyritøkur hava netverk uttanlands, men innanhýsis í Føroyum er avmarkað samstarv, vitanarskifti og innlit ímillum stovnar og vinnur. Tað elvir til trupulleikar, til dømis við at fáa dátur til vegar.

Tørvur er á betri sambandi millum tey, ið framleiða dátur, og tey, ið skulu brúka tær. Tilvild ræður á økinum og nógv er alt ov persónstengt. Ynskiligt hevði verið við einum millumliði, sum kundi savnað dátur inn frá øllum til at útvega granskarum og øðrum. Samstarv við Hagstovu Føroya er ein møguleiki.

Avmarkaða samstarvið er ein avbjóðing í mun til at menna og fremja gransking, menning og nýskapan, umframt at kappingin um fígging til verkætlanir frá ymsu stuðulsskipanunum økist.

Ein ætlan fyri tvørfakligum samstarvi millum einstøku stovnarnar kann tryggja felags mál og gera virksemið og granskingina bæði sterkari og munadyggari. Karmar eiga eisini at verða lagdir fyri at lætta um samstarv úteftir, draga vísindafólk og starvsfólk til Føroya og fyri at tryggja betri kor fyri granskingarumhvørvið og vinnuna.

**Fróðskaparsetrið og vinnan**
Fróðskaparsetrið er farið undir eina tilgongd at menna samstarv sítt við vinnuna í Føroyum. Granskingarsamstørv eru fingin í lag við vinnulívið, og hesi eru oftast grundað á øki, ið vinnan hevur serligan áhuga fyri og sum gagna vinnuni beinleiðis.

Fleiri vinnufyritøkur eru áhugaðar í gransking, men tær ynskja sum oftast, at granskað verður í teirra egna, oftast avmarkaða, øki. Endamálið hjá teimum er at fáa okkurt ítøkiligt burturúr, sum til dømis betri vørur. Tað kann vera trupult at finna ein granskara í Føroyum, sum er áhugaður í júst sama evni, sum fyritøkan er áhugað í, og fyritøkur kunnu hava torført við at síggja, hvønn leiklut Fróðskaparsetrið eigur at hava í sambandi við gransking og menning.

Gransking kann geva eini fyritøku nógv annað enn fíggjarligar ágóðar, serliga gera arbeiði meira spennandi fyri starvsfólk og draga vælútbúgvin og dugnalig starvsfólk til fyritøkuna.

Tað er sera týdningarmikið, at samstarv millum Fróðskaparsetrið og vinnuna verður skipað við virðing fyri, at Fróðskaparsetrið hevur skyldu til at fremja og verja objektiva gransking og granskingarfrælsi.

> *Fyri at tryggja eina áhaldandi tilgongd av uttanhýsis fígging, má føroyska samfelagið eisini veita eina grundfígging*

**Eitt samlað heilsuverk**
Eitt vælskipað heilsuverk er grundað á tríggjar grundsúlur, ið eru útgreining/viðgerð, útbúgving og gransking. Allar tríggjar súlur eru neyðugar fyri at tryggja, at heilsuverkið altíð hevur eina nøktandi tilgongd av útlærdum fólki, og at tað hevur ta nýggjastu vitanina til frama fyri sjúklingar og samfelag. Útreiðslurnar til heilsuverkið vaksa áhaldandi, men besta fortreytin at tálma útreiðsluvøkstrinum er, at heilsuverkið er væl skipað við væl útbúnum fólki, so peningur ikki verður nýttur til óneyðuga útgreining og viðgerðartilboð.

Átøk eru gjørd fyri at savna royndir, førleikar og vitan um heilsugransking á einum stað. Ein heilsugranskingareind er stovnsett, ið skal savna alla heilsugransking í Sjúkrahúsverkinum, og Depilin fyri heilsugransking tryggjar samstarv millum Sjúkrahúsverkið og Fróðskaparsetrið.

Útlitini fyri heilsugransking eru góð í Føroyum, men fyri at tryggja eina áhaldandi tilgongd av fígging, serliga útlendskari fígging, má føroyska samfelagið eisini veita eina grundfígging, so at serliga peningasterkir útlendskir grunnar kunnu hava álit á, at almennu Føroyar veita tryggar og góðar karmar fyri heilsugransking í Føroyum.

Eisini er tað ein fortreyt fyri framhaldandi framburði innan heilsugransking, at Landssjúkrahúsið verður skipað sum eitt universitetssjúkrahús, ið er atknýtt einum universiteti – Fróðskaparsetrinum. Sum universitetssjúkrahús kann Landssjúkrahúsið skipa neyðuga bygnaðin við lektarum og professarum við ábyrgd fyri granskingini. Samstundis eigur at verða arbeitt við at menna eina útbúgving í læknafrøði, sum í stóran mun kann vera staðsett í Føroyum.

*Umsóknarskriving átti at verið samskipað í nógv størri mun við skrivstovustuðli og leiðbeining*

**Útlendsk fígging og leiðbeining**

Luttøkan í Horizon Europe er ein rík kelda til uttanhýsis fígging til gransking, menning og nýskapan, men hon krevur samstarv og samskipan. Tilgongdin at søkja um stuðul er ógvuliga krevjandi, serliga hjá smærru aktørunum.

Kappingin um at fáa stuðul til gransking, menning og nýskapan frá ES er hørð, og umsóknarskrivingin krevur íløgur bæði av tíð og pengum. Fyri vinnuna kann tilgongdin vera so drúgv og tung umsitingarliga, at tey orka ikki at fáast við tað. Hetta arbeiðið átti at verið samskipað í nógv størri mun við skrivstovustuðli og leiðbeining.

Fyrisitingarligur stuðul til umsóknararbeiði er í ávísan mun vorðið raðfest frá politiskari síðu seinnu árini, til dømis við nýliga stovnaðu granskingar- og framtakseindini á Fróðskaparsetrinum, sum hevur bøtt munandi um karmarnar kring ph.d.-økið og -útbúgvingina. Hetta virksemi kundi við fyrimuni verið víðkað, soleiðis at tilboð um hjálp til umsóknarskriving, vegleiðing og annað skrivstovuarbeiði í sambandi við stuðulsumsóknir eisini verður tøkt hjá øðrum granskarum og nýskaparum enn teimum, sum eru beinleiðis knýtt at Fróðskaparsetrinum.



Hvalastøðin við Áir, sum áður var ein vinnuligur miðdepil, er nú eitt savn fyri ídnaðararvi okkara

# 4. Mál og tilmæli

Ráðið fyri gransking, menning og nýskapan **mælir til at:**

1. Gransking, menning og nýskapan verða raðfest hægri
2. Fróðskaparsetrið verður snúningsdepil fyri gransking, menning og nýskapan
3. Depil fyri gransking, menning og nýskapan verður mentur
4. Ítøkilig mál verða sett og karmarnir verða styrktir fyri føroyskari luttøku í altjóða samstarvi
5. Ætlan verður løgd fyri, hvussu Føroyar kunnu verða áhugaverdari fyri granskarar
6. Grundjáttanir til granskingarstovnar verða øktar og serføroysk granskingarøki raðfest
7. Greiðar mannagongdir verða gjørdar fyri móttøku av útlendskari fígging
8. Fíggingarleistir, ið ikki hava verið nýttir í Føroyum áður, verða kannaðir

**Raðfesting**

### 1. Gransking, menning og nýskapan verða raðfest hægri

Evroparáðið hevur sett sum mál, at 3% av BTÚ skulu brúkast til gransking, menning og nýskapan. Føroyar eiga at seta sær sama mál sum londini, vit samanbera okkum við, serliga um vit skulu halda fram við og økja okkara samstarv og kapping við hesi.

Góðir karmar skulu skipast fyri gransking, menning og nýskapan, herundir fortreytir, ið geva fyritøkum áræði at skapa nýtt og granskarum kor til at útinna bæði grund- og nýtslugransking.

Granskingarverkætlanir skulu í størri mun verða heftar at einum yvirskipaðum endamáli og eini langtíðarætlan.

Størri dentur eigur at verða lagdur á gransking, menning og nýskapan í øllum stigum í skúlaskipanini. Gransking, menning og nýskapan eru viðkomandi evni í so at siga øllum lærugreinum. Við at leggja størri dent á gransking, menning og nýskapan ber til at geva børnum íblástur á heilt øðrvísi hátt enn við vanligari undirvísing. Ein langtíðar ætlan skal leggjast fyri gransking, menning og nýskapan í undirvísingini heilt úr fólkaskúlanum til Fróðskaparsetrið.

**Samstarv**

### 2. Fróðskaparsetrið verður snúningsdepil fyri gransking, menning og nýskapan

Sum einasta universitet í Føroyum eigur Fróðskaparsetur Føroya at hava ein munandi størri leiklut viðvíkjandi gransking, menning og nýskapan, enn tað hevur í dag. Vísindaligu førleikarnir á Fróðskaparsetrinum kunnu við fyrimuni gagnnýtast av og verða mentir í samstarvi við aðrar stovnar og fyritøkur, bæði almennar og privatar, og samfelagnum annars.

Aðalmálið hjá Fróðskaparsetrinum er burðardygg menning av føroyska samfelagnum. Tað samsvarar við yvirskipaða endamálið hjá Ráðnum um, at gransking, menning og nýskapan skulu tryggja okkara vælferðarsamfelag búskaparliga, samfelagsliga og umhvørvisliga nú og í nógv ár frameftir.



**Á nógvum økjum er gott og neyðugt samstarv millum granskarar og leikfólk**

Økt og betri samskipað samstarv millum Fróðskaparsetrið og granskingarstovnarnar fer at gera, at tey kunnu gagnnýta hvønn annan betri. Útbúgvingar innan til dømis matvøru kunnu skipast í samstarvi við Heilsufrøðiligu Starvsstovuna, heilsuútbúgvingar knýtast at Landssjúkrahúsinum, fiskalívfrøði at Fiskaaling o.s.fr. Fyri heilsuverkið kann tað merkja, at Landssjúkrahúsið kann gerast universitetssjúkrahús.

Fróðskaparsetrið skal hava yvirskipaðar uppgávur, sum vanta aðrastaðni, men stovnarnir eiga framvegis at hava egna játtan og sjálvræði. Í verandi líki megnar Fróðskaparsetrið neyvan at lyfta hesar uppgávur, men tað kann mennast til at megna tað í framtíðini.

Hugskotið um Fróðskaparsetrið sum eitt slag av regnskjóli yvir allar aðrar granskingarstovnar er ikki nýtt. Ein ávís mótstøða og fyrivarni hava verið í sambandi við hugskotið, tí hugsast kann, at ein slíkur bygnaður ikki gevur sama neyva innlitið í hvønn stovnin ella samsvarandi raðfestingar, og tað kann órógva avgerðarrætt, ábyrgdarbýti, fígging og annað tílíkt. Umráðandi er at hava atlit til hesi viðurskifti.



**Nógvir ymsir hættir verða nýttir at savna vitan um fugl í Føroyum**

Savningarstað

### 3. Depil fyri gransking, menning og nýskapan verður mentur

Stórur tørvur er á at styrkja tvørfakliga samstarvið, bæði stovnanna millum og millum alment og privat, og eftirspurningur er eftir kørmum, sum lætta um samstarv úteftir, draga vísindafólk til Føroya og tryggja betri kor fyri granskingarumhvørvið.

Fyri at fáa so nógv sum gjørligt burtur úr fáum – men góðum – kreftum, verður mælt til at menna ein depil fyri gransking, menning og nýskapan. Ein tílíkur depil kann verða ein natúrligur partur av Fróðskaparsetrinum, nú allar deildirnar verða savnaðar á Frælsinum við kampus og øllum tí, ið hoyrir einum nýmótans universiteti til.

Ein slíkur depil á nýggja kampus kann verða savningarstað fyri granskarar, nýskaparar, vinnu, íverksetar, íleggjarar og lesandi. Eisini kann hann gerast karmur um eina víðkaða útgávu av iNOVA við granskingarundirstøðukervi, ið er til taks fyri allar áhugapartar. Talan skal vera um eitt fyrstafloks granskingarumhvørvi, sum eisini kann lokka fleiri útlendskar granskarar og lesandi til landið.

Ein depil fyri gransking, menning og nýskapan kann vera staðið, "har heilar hittast", og í slíkum umhvørvi birtast nýggir eldar. Við at savna lesandi, granskarar, íverksetar og vinnulívsfólk kunnu  góð hugskot um nýggjar loysnir loftast  og mennast og verða til veruleika.

Ein depil á Fróðskaparsetrinum, ið eisini fevnir um starvsfólk hjá tí privata, hevði eisini kunna verið við til at broyta ímyndina av, at Fróðskaparsetrið fyrst og fremst framleiðir starvsfólk til almenna geiran.

Nú føroysku vinnuframapartarnir, sum húsast í Sjóvinnuhúsinum, skulu finna sær nýggj høli, er upplagt, at hesi eisini verða hýst í einum føroyskum hugmyndahúsi saman við Fróðskaparsetrinum.

Fleiri lond hava líknandi deplar. Í Íslandi hava tey hugmyndahúsið *Gróska*, sum er savningardepil fyri nýskapan og samstarv millum hægri útbúgvingarstovnar og vinnuna, har bæði einstaklingar og størri fyritøkur kunnu leiga høli.[8] Í sama bygningi húsast *Tøknitorgið*, sum er ein tøkni- og vitanarflutningsskrivstova, ið tænir øllum lærdu háskúlum og granskingarstovnum í Íslandi við ráðgeving um til dømis hugverksrætt og marknaðargreining.[9]

Í Noregi hava tey økt nógv um granskingarvirksemið og ávirkanina av gransking við at savna ymsu aktørarnar, og í Ísrael er eisini nýskapanardepil, ið hevur hepnast sera væl.

Karmar

### 4. Ítøkilig mál verða sett og karmar verða styrktir fyri føroyskari luttøku í altjóða samstarvi

Føroyar hava valt at vera við í fleiri útlendskum skipanum, sum geva føroyskum aktørum møguleika at søkja stuðul til gransking, menning og nýskapan. Eingin ivi er um, at vit eiga at vera við í altjóða samstarvi, sum gevur okkum nýggja vitan og netverk. Men tað er týdningarmikið at hava eina ætlan fyri, hvørjum skipanum vit skulu luttaka í.

Eingin skipað ætlan er gjørd fyri hesum, og tað fer heldur ikki at bera til at gera eina slíka ætlan, fyrrenn vit hava neyv hagtøl á økinum. Tað er tó longu greitt, at vit ikki gagnnýta verandi skipanir til fulnar, lutvíst vegna vantandi orku og førleikar at søkja um luttøku og stuðul.

Ein munadyggur máti at koma við í altjóða samstørv og økja møguleikan fyri at fáa stuðul til verkætlanir er at arbeiða miðvíst saman við samstarvspørtum um umsóknir til ymsu skipanirnar.

8 www.groska.is
9 www.ttoiceland.is

Mælt verður til at styrkja karmarnar fyri føroyskari luttøku í altjóða samstarvi við at seta munandi játtanir av til luttøku í evropeiskum og norðurlendskum partaløgum og til fyrisitingarligan stuðul til arbeiðið við umsóknum og verkætlanum.

Mælt verður til, at Føroyar seta sær sum mál at økja um árliga talið av umsóknum til ymsu altjóða skipanirnar við 30% um árið komandi 3 árini. Hetta skal galda fyri bæði almennar stovnar og fyritøkur.

Fyri at kunna fylgja við gongdini verður mælt til, at landsstýrismaðurin áleggur almennum stovnum og heitir á fyritøkur at fráboða Granskingarráðnum í minsta lagi hálvárliga, hvussu nógvar umsóknir eru sendar til hvørjar skipanir, og síðani at boða frá, hvussu gekst hvørjari umsókn. Granskingarráðið skal skipa hetta tilfarið og lata Hagstovuni tað til goymslu.

Granskarar og nýskaparar lyfta í stóran mun sjálvir umsitingarliga arbeiðið við verkætlanunum, og tað tekur nógva tíð og orku frá veruliga granskingar- og nýskapanararbeiðinum. Mælt verður til, at arbeiðið viðvíkjandi umsóknum til stuðul og annað skrivstovuarbeiði verður savnað og standardiserað í nógv størri mun.

Fyrisitingarligur stuðul til umsóknararbeiði er vorðið raðfest í ávísan mun við granskingar- og framtakseindini á Fróðskaparsetrinum. Mælt verður til, at hetta virksemið verður víðkað, soleiðis at tænastan eisini verður tøk hjá øðrum granskarum og nýskaparum enn teimum, sum eru beinleiðis knýtt at Fróðskaparsetrinum.

**Ætlan**

**5. Ætlan verður løgd fyri, hvussu Føroyar kunnu verða áhugaverdari fyri granskarar**

Eitt høvuðsendamál við at raðfesta Fróðskaparsetrið seinastu árini hevur verið at steðga fráflytingini av ungum føroyingum og bjóða teimum hægri útbúgving, sum tey kunnu taka her heima ístaðin fyri at fara av landinum. Hetta hevur eydnast í stóran mun, men enn er nakað eftir á mál.

Bert 24 av teimum 122 føroyingunum [10], sum hava lokið ph.d.-prógv seinastu 10 árini, hava gjørt tað á Fróðskaparsetrinum. Restin hevur lokið prógv í Norðurlondum (76) ella aðrastaðni (22).

Ein víðkaður sjónarringur og altjóða royndir eru ikki at forsmáa, og nógv, sum lesa uttanlands, koma heim aftur við granskingarroyndum á grundfestum granskingarøkjum, sum ikki eru møguligar at fáa í Føroyum. Men um eingin partur av útbúgvingini innan ávíst fakøki er tøkur í Føroyum, so verður tað heldur ikki eins natúrligt at hava føroyska gransking innan sama fakøki.

Ynskiligt hevði verið at fingið í minsta lagi partar av fleiri útbúgvingum tøkar í Føroyum, og í hesum sambandi er umráðandi at taka støði í, hvørji fakøki okkum tørvar fyri at tryggja okkara búskaparliga, samfelagsliga og umhvørvisliga haldføri og mótstøðuføri.

Fyri at tryggja tøkniligu menningina í Føroyum tørvar okkum eitt tekniskt fakultet, eina føroyska útgávu av DTU í Danmark og NTNU í Noregi. Tað hevði kunnað elvt til meira gransking, menning og nýskapan innan virðisøking, sum kann flyta okkum frá útflutningi av óvirkaðari ráværu, ið hvørki er lívfrøðiliga ella fíggjarliga burðardygt í longdini, til í størri mun at útflyta hávirðisvørur.

Tørvur er eisini á einum breiðari útboði av útbúgvingum á KT-økinum, har vit hava lutfalsliga nógv færri fakfólk enn okkara grannalond. Í løtuni er KT-verkfrøði einasta KT-útbúgving í Føroyum, men tørvur er eisini á útbúgvingum í til dømis teldufrøði, talgildum virkisbúskapi, sniðgávu og spælmenning, umframt at tað eigur at bera til at fara í læru sum KT-supportari uttan at fara av landinum.

10 Skilmarking: Fólk í Føroyum ella føroyingar uttanlands



**Nógv verður granskað í sambandinum millum rørslu og heilsu**

Tað eigur eisini at vera gjørligt at taka útbúgving í byggiverkfrøði í Føroyum. Okkara byggivinna er stór, og vit byggja øðrvísi enn í t.d. Danmark, har flestu byggifrøðingar nema sær útbúgving.

Harumframt er stórur tørvur á vitan og starvsfólki við drúgvari fakligari bakgrund á veterinera og lívfrøðiliga økinum eins og á fleiri øðrum økjum.

Á Fróðskaparsetrinum eru ítøkilig uppskot um at seta útbúgvingar á stovn, men hetta krevur bæði fígging og førleikar, serliga granskingarførleikar innan økini.

Mælt verður til at leggja eina ætlan fyri, hvussu Føroyar kunnu verða áhugaverdar fyri teir bólkar av starvsfólki, granskarum og íverksetum, sum tørvur er á, og hvussu fleiri kunnu fáa útbúgving á hesum økjum.

Somuleiðis verður mælt til, at Fróðskaparsetrið fær oyramerkta fígging til at seta ph.d.-verkætlanir í gongd á øllum fimm deildum, so at undirvísing og gransking á deildunum samsvara samfelagstørvinum, umframt at Fróðskaparsetrið harvið kann bjóða granskingargrundaða undirvísing á altjóða støði.

Mælt verður eisini til, at oyramerkt fígging verður veitt Fróðskaparsetrinum til granskingarøki, ið eru neyðug og eftirspurd í samfelagnum, so at hesi kunnu raðfestast. Núverandi leistur, har tey, ið hava fingið uttanhýsis fígging til vegar, sleppa framat at granska, er ikki burðardyggur í mun til at fremja áhaldandi menning og vitan innan viðkomandi samfelagsøki.

**Játtan**

### 6. Grundjáttanir til granskingarstovnar verða øktar og serføroysk granskingarøki raðfest

Gransking, menning og nýskapan eiga at verða raðfest munandi hægri á fíggjarlógini, og hædd má takast fyri, at fígging til ymsu granskingarstovnarnar, sum eru ógvuliga spjaddir millum aðalráðini, ikki verður treytað av, hvussu aðalráðini annars verða raðfest í fíggjarlógini.

Til tess at tryggja áhaldandi gransking, menning og nýskapan mugu grundjáttanirnar í minsta lagi fylgja við prístalinum, men á fleiri økjum eisini økjast. Dagligi raksturin á granskingarstovnum kann ikki verða tengdur at útlendskum fíggingarkeldum, tí tað gevur ov stór sveiggj í inntøkunum. Um ongin peningur er tøkur eitt tíðarskeið, dettur virksemið burtur, og granskararnir finna sær annað at gera. Tá peningur er tøkur aftur, kann gerast ógvuliga tungt at endurskapa virksemið.

Neyðugt er at vera opin fyri útlendskari fígging, sum til dømis spælir ein stóran leiklut fyri heilsugranskingina. Útlendsk fígging er treytað av nøktandi kørmum, herundir væl skipaðum umstøðum og almennari grundfígging. Útlendskir aktørar eru heldur ikki áhugaðir í at fíggja granskingarøki, ið eru avmarkað til serføroysk viðurskifti.

Vinnufyritøkur mugu eggjast til at gera fleiri íløgur í gransking, menning og nýskapan, og viðurkendir granskarar mugu í størri mun taka ábyrgd av at fáa fígging til vega til síni granskingartoymi.

**Mannagongdir**

## 7. Greiðar mannagongdir verða gjørdar fyri móttøku av útlendskari fígging

Endamálið við allari gransking í Føroyum má vera at skapa vitan til gagns fyri føroyska samfelagið, og tí mugu tað ikki vera onnur enn vit sjálvi, ið stýra.

Um eginfíggingin er lutfalsliga lítil, kann privat og útlendsk fígging skjótt taka stýringina. Til dømis er vandi fyri, at rúm ikki verður fyri nógvum øðrum enn diabetes-gransking, um Novo Nordisk grunnurin skal fíggja meginpartin av heilsugranskingini.

Umráðandi er eisini at skyna ímillum grunnar við alment gagnligum endamáli og reint vinnuligar fyritøkur. Privatar fyritøkur hava altíð eitt vinnuligt endamál við síni gransking og granskingarstuðli, sum ikki neyðturviliga sampakka við aðalmálini hjá almennu Føroyum. Sostatt er eisini neyðugt at hava greiðar mannagongdir fyri, hvussu vit taka ímóti stórum upphæddum, so at hesar ikki skeikla granskingarlandslagið.

**Skipanir**

## 8. Fíggingarleistir, ið ikki hava verið nýttir í Føroyum áður, verða kannaðir

Mælt verður til at kanna fíggingarleistir, ið ikki hava verið nýttir í Føroyum áður.

Í grannalondunum eru fleiri sløg av stuðulskeldum, sum vit ikki hava roynt í Føroyum. Í Noregi hava tey *Fiskeri- og havbruksnæringens forskningsfond*, sum norska ali- og fiskivinnan leggur ein fastan part av sínum inntøkum í. Grunnurin letur stuðul til gransking, sum vinnan hevur tørv á. Tað ger eisini, at minni trýst verður á alment fíggjaðu grunnarnar, sum í størri mun kunnu fíggja grundgransking, heilsugransking, mentanargransking, samfelagsgransking o.s.fr.

Skattafrádráttur fyri granskingar-, menningar- og nýskapanarvirksemi er vanligur í okkara grannalondum fyri at eggja til økta gransking, menning og nýskapan. Í Danmark veitir sonevnda *Forskerordningen* útlendskum granskarum og øðrum høgt útbúnum starvsfólkum ein skattafyrimun, meðan tey arbeiða í Danmark í eitt avmarkað áramál. Hetta ger tað møguligt at draga nógva útlendska serfrøði til landið.

Í Íslandi hava tey skattaafturberingarskipan fyri granskingar-, menningar- og nýskapanarvirksemi, sum er 35% fyri smærri fyritøkur og íverksetar og 25% fyri størri fyritøkur. Eisini hava tey skattafyrimunir fyri einstaklingar, ið gera íløgur í nýstovnað virki[11] og váðafúsar íløgugrunnar til tøknimenning og íverksetan.

Í Ísrael hava tey eina skipan, sum tryggjar, at fyri hvørja krónu, sum vinnan leggur í eina verkætlan, leggur landið eisini eina. Hetta hevur serliga stimbrað nýskapan munandi.

Serligar skattaskipanir fyri granskarar og íverksetar hava áður verið í uppskoti í Føroyum, men politiskur hugur hevur ikki verið fyri tí. Í Føroyum hevði virðið av at fáa skikkað fólk til landið við einum skattafyrimuni sannlíkt verið munandi størri enn mista skattainntøkan. Eisini er vert at hava í huga, at lætt er at flyta millum Føroyar og Danmark, og at tað tí verður trupult at fáa nýggjar fyritøkur at velja Føroyar, um betri skipanir eru í Danmark.

11 Nordic Ignite framløga "Icelandic ecosystem"

# 5. Skilmarkingar

## Gransking & menning

**Gransking:** Skapandi og skipað arbeiði, sum hevur til endamáls at økja um vitanarfæið, harímillum vitan um mannaættina, náttúruna, mentan og samfelag, og at finna nýggjar hættir at brúka tøka vitan.

**Granskari:** Persónur, sum hevur lokið ph.d.-útbúgving ella hevur vunnið sær líknandi førleika við arbeiðsroyndum, og sum kann verða mettur ájavnt við í minsta lagi adjunktstig. Ein granskari fæst við vitanargitnað og -skapan. Hann ella hon granskar og betrar ella mennir hugtøk, ástøði, myndlar, tólbúgving, ritbúnað ella rakstrarhættir.

**Viðurkendur granskari:** Persónur, sum í eitt áramál hevur arbeitt við gransking á vísindaligum stigi, og sum kann verða mettur ájavnt við í minsta lagi lektarastig ella professarastig.

**Granskingarkønur:** Persónur, sum antin í eitt áramál hevur fingið innlit í og royndir við granskingarverkætlanum, ella sum á leiðslustigi á stovni ella í vinnuvirki hevur vunnið ítøkiligar royndir við granskingarfyrisiting, granskingarleiðslu, granskingarmiðling ella granskingarpolitikki.

**Grundgransking:** Gransking, sum fær til vega nýggja vitan um grundleggjandi orsakir til fyribrigdi og ítøkilig fakta, og sum ikki er beinleiðis tengd at ídnaðarligum ella vinnuligum málum.

**Nýtslugransking:** Gransking, sum hevur sum mál at fáa til vegar nýggja vitan, sum kann nýtast til at menna nýggjar framleiðslur, tilgongdir ella tænastuveitingar.

**Menning:** Skipað arbeiði, sum er grundað á vitan, ið er vunnin gjøgnum gransking ella praktiskar royndir við tí endamáli at fáa til vegar nýtt ella munandi betrað tilfar, vørur, tilgongdir, skipanir ella tænastuveitingar.

**Royndir:** Innsavnan av dátum sum grundarlag undir gransking.

## Nýskapan

**Nýskapan:** Verkseting av nýggjari ella munandi betraðari vøru ella tænastuveiting, tilgongd, nýggjum marknaðarføringarhátti ella einum nýggjum skipanarligum hátti í vinnupraksis ella á arbeiðsplássi ella uttanhýsis sambondum.

**Íverksetan:** At seta í verk egið virksemi.

**Íverksetari:** Persónur, ið íbirtir og setur í verk egið virksemi.

## Stovnar & fyritøkur

**Granskingarstovnur:** Ein stovnur, sum hevur gransking sum eitt av sínum høvuðsendamálum.

**Nýskapandi fyritøka:** Ein fyritøka, ið veitir eina nýggja ella betraða vøru ella setur í verk tilgongd, ið er munandi øðrvísi enn fyrrverandi tilgongdir.

**Nýskapanarvirkin fyritøka:** Ein fyritøka, sum fremur nýskapanarvirksemi, herundir gransking, í sambandi við menning ella íverksetan av nýggjum ella betraðum vørum ella tilgongdum við ætlan um ávísa nýtslu.

## Karmar og leiðreglur

**Granskingarfrælsi:** Granskingarfrælsi fevnir um fría rættin at velja sær granskingarspurningar, at bjóða almannahugsan av gjøgnum dygdargranskingarhættir og at framleggja nýggj hugskot og ástøði. Tað fevnir um rættin hjá granskarum opið at skifta, breiða út og geva út dátur og granskingarúrslit, eisini gjøgnum venjing og frálæru, og at hava samband við yrkis- ella akademiskar felagsskapir uttan at vera fyri vanbýti í sínum starvi, lands- ella stovnssensuri ella mismuni.

**Granskingaretikkur og -falsloysi:** Granskingaretikkur og -falsloysi snýr seg um álit, reinlyndi, virðing og ábyrgd av at útvega álítandi granskingarúrslit á ein gjøgnumskygdan hátt, ið kann endurskapast. Tað snýr seg um at mótvirka útbreiðslu av falsvísindum og rongum upplýsingum og soleiðis varðveita álitið á vísindini, á vísindaliga háttalagið og á sambandið millum vísindi, vísindafólk og samfelag.

**Hugverksrættur:** Rætturin hjá einstaklinginum at ráða yvir egnum hugverki. Rætturin fevnir vanliga um einkarrætt til nýtslu av verkinum í avmarkað tíðarskeið. Kendastu sløgini av hugverksrætti eru høvundarættindi, upphavsrættur, patent, vørumerki og handilsloyndarmál.

**Alment atgeingi / opin vísindi:** Vísindalig úrslit, ið eru tøk fyri øll, leik sum lærd. Gjøgnumskygd og atkomulig vitan, ið verður lutað út og ment gjøgnum samstarvandi netverk. Opin og stundislig atgongd til vísindaligar útgávur, eins og skipan, varðveiting og í tann mun, tað ber til, atkoma til granskingardátur, -ritbúnað og keldukotur, ið granskingin framleiðir.

**Granskingarábyrgd:** Ábyrgd hjá granskarum av, at gransking teirra er luttakarum, viðkomandi bólkum ella samfelagi at gagni, og at hon ikki er skaðilig. Í avgerðum viðvíkjandi gransking skulu fyrilit takast fyri, um menning av ávísum granskingarøki kann hava avleiðingar fyri einstaklingar, djór, samfelag ella umhvørvi, ið ikki kunnu góðtakast etiskt. Tað er treytaleyst krav, at granskarin í almennum kjaki týðiliga skilir ímillum yrkisligar viðmerkingar frá serfrøðini og egin sjónarmið, og at hann ella hon ikki misnýtir sín myndugleika.

**Granskingarloyvi:** Loyvi, ið ávísum føri skal útvegast fyri at fáa atgongd til evni, ið skal granskast. Skal útvegast frá øllum, ið taka lut í eini granskingarverkætlan, og tey skulu hava allar neyðugar upplýsingar fyri at kunna veita eitt kunnað samtykki.

## Starvsheiti

**Ph.d.-lesandi:** Ph.d. er stytting fyri philosophiae doctor (doktari í filosofi). Hetta er vanliga ein 3 ára granskaraútbúgving, sum í dag er kravd fyri at kunna fáa starv sum granskari á universitetum og granskingarstovnum. Eisini fleiri virkir, serliga tey, sum arbeiða við menning av nýggjum vørum og tænastum, seta fólk við ph.d.-útbúgving í starv.

**Postdoc:** Fyribils granskarastarv hjá einum, sum hevur lokið ph.d.-prógv. Postdoc er stytting fyri *postdoctoral researcher*. Postdoc-starvið er vanliga ein 4 ára ella styttri starvsseting á Fróðskaparsetrinum, einum øðrum granskingarstovni ella hjá eini fyritøku.

**Adjunktstarv:** Starvsheiti fyri tíðaravmarkað undirvísingar- og granskingarstarv á Fróðskaparsetrinum. Adjunktstarvið kann verða til fast starv sum lektari, um lektaratreytirnar verða hildnar innan fyri tíðarásetingina. Fyri at verða sett/ur í starv sum adjunktur er ph.d.-útbúgving ella samsvarandi granskingarførleiki ynskiligt, men hjá einum, sum hevur skjalprógvað granskingarevni, ber til at skriva ph.d.-ritgerð og menna seg bæði sum granskari og undirvísari í adjunkttíðini, sum vanliga er 3-4 ár, alt eftir umstøðum og avtalu frammanundan.

**Lektarastarv:** Starvsheiti fyri fast vísindastarv á Fróðskaparsetrinum. Lektarar skulu hava sera góðan vísindaligan og fakligan førleika á sínum øki. Lektarar skulu eisini hava góðan pedagogiskan førleika og fyrisitingarroyndir í sambandi við hægri undirvísing og gransking.

**Professarastarv:** Starvsheiti fyri fast vísindastarv á Fróðskaparsetrinum. Professarar skulu hava besta vísindaliga og fakliga førleika, góðan pedagogiskan førleika og hollar fyrisitingarroyndir í sambandi við hægri undirvísing og gransking. Professarar hava evstu fakligu ábyrgd av sínum fakøki. Professarar hava, undir umsjón frá dekani, serliga ábyrgd av góðskuni í gransking og undirvísing á sínum øki og at stuðla starvsfeløgum í fakligari menning.


Her hefr upp kristin dom ok
kristiliga tru til guðs
Þat er upphaf laga
varra gula þings manna
sem upphaf er allra
goðra luta. at vér skolum
halda ok hava kristilega
tru. Vér skolum trua a guð. ok ...
ok gengr sua ut sem stendr
i landsbokinni þessi kapitu.
Um heiðin atrunað ok villu.
Nu af þui at allir men
ero skyldugir at halda þa
tru er ver hofum heitit guði i
skirn uarre ok aðr uar upp told. þa
a kungr ok biskup með mikilli gaum
gæfi at ransaka at men fare
með of mikilli uillu ok heiðnum
atrunaðe. En þessir lutir hoeva
till uillu. galdrar ok gerningar
ok sa er kallar nockon man trol
riðu. ok trua a landuettir at þer
seu i haugum eða forsum. Sua ok
uti sett at spyria orlaga. ok þin
er af hendis segia ser guð ok hei
laga kirkiu. þat er at þer skolu fe

i haugum finna eða aðra leið riker
verða eða nockors uisir. Sua ok þer
er freista drauga upp at ressa eða
haug bua. Nu ef nockor uerðr
kunnr ok sannr at þui at hann fare
með þinn uanda atrunaðe ok heiðne
villu. eða sampyckir þeim er með
sliku fara. þa er han utlegur ok
allt fe hans. þat a halft kungr en
halft biskup. en ef þat meler umboðes
maðr kungs eða biskups at maðr at
hann fare með einum hueriu þessum
vanda atrunaðe ok fer þat aei laugle
ga huat a hende hanum. þa syne með
tylftar eiði. felle til utlegðar ef
fellr. Um tiunda gerð ok huersu skipta.
Ver skolum lyðnir vera biskupi
uarum en han os hollr ok
goðuiliaðr. en þat hofum ver
mælt með biskup uarn. at han skal os
þionostu ueita. en uer skolum sua
oðulast at ver skolum gera tiund alla
ok fulla af auexti ollum ok uiðr eldi.
fiski ok fugle ok ollum rettum afla.
en henni skal sua skipta. at biskup
skal hava fiorðung. en fatækir

Hóast bert fáar skrivligar keldur um elstu søgu Føroya eru varðveittar, fæst nógv vitan úr hvørjum skjali

# 6. Keldulisti


CO-PI. (2020). *Om Innovationsbarometeret.* From CO-PI - Center for Offentlig og Privat Innovation: www.co-pi.dk/media/52863/spoergeskema-til-arbejdspladser-innovatinsbarometeret-30-2020.pdf

Gróska. (2023). *Gróska*. From www.groska.is

Heinesen, R. (28. september 2022). *Hagtøl eftir altjóða leisti - Gransking og Menning.* From gransking.fo: https://gransking.cdn.fo/savn/4328/upprit_g-m.pdf?t=10438020&s=6n9OB-5CKv0DspYquj8zTSuRmSlk

Heinesen, R. (28. september 2022). *Hagtøl eftir altjóða leisti - Nýskapan.* From gransking.fo: https://gransking.cdn.fo/savn/4329/upprit_nýskapan.pdf?t=10437988&s=oOmn_eL5xdU-OPa7Wmj7CYpKt2vA

Hines, P. (2017). *Why fund research? A guide to why EU-funded research and innovation matters.* Brussels, Belgium: Science Business Publishing Ltd. From https://sciencebusiness.net/system/files/reports/Why-fund-research_.pdf

McKinsey Scandinavia. (2012). *Charting a Growth Path for Iceland, version 1.0.* McKinsey & Company.

OECD. (2015). Frascati Manual 2015: Guidelines for Collecting and Reporting Data on Research. *The Measurement of Scientific, Technological and Innovation.* Paris: OECD Publishing. doi:http://dx.doi.org/10.1787/9789264239012-en

OECD/Eurostat. (2018). Oslo Manual 2018: Guidelines for Collecting, Reporting and Using Data on Innovation, 4th Edition. *The Measurement of Scientific, Technological and Innovation Activities.* Paris/Eurostat, Luxembourg: OECD Publishing. From https://doi.org/10.1787/9789264304604-en

Roberts & Eesley. (2011). Entrepreneurial Impact: The Role of MIT. *Foundations and Trends in Entrepreneurship,* 7(1-2), pp. 1-149. doi:10.1561/0300000030

Scandinavia, M. (2012). *Charting a Growth Path for Iceland.* McKinsey & Company.

TTO Iceland. (2023). *Auðna Tæknitorg.* From www.ttoiceland.is

Ráðið fyri gransking, menning og nýskapan